| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13037<br><br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 19. mai 2016 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrun Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Ingunn Eiriksdóttir

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13038 | |
| | Formansins merki: | |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 125/16 | 16/00042-1 | Mál beind í nevndir 2016 | 13040 |
| 126/16 | 16/01984-1 | Uppsamlingsmál ár 2016 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir | 13041 |
| 127/16 | 14/01009-29 | Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, og frítíðartilboð til børn í 3. flokki | 13042 |
| 128/16 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 13052 |
| 129/16 | 14/01802-1 | Kvøldskúlin - hølisviðurskifti | 13060 |
| 130/16 | 16/01585-1 | Eykajáttan til Heilsu- og umsorganartænastuna 2016 | 13067 |
| 131/16 | 16/01514-1 | Árligur rakstrarstuðul á mentanarøkinum – flyting til aðrar kontur | 13070 |
| 132/16 | 14/01151-6 | Reglugerð Tilhaldið | 13071 |
| 133/16 | 16/01062-14 | Sáttmáli koyring av døgverðaportiónum frá Lágargarði til heimabúgvandi pensionistar. | 13073 |
| 134/16 | 14/05065-1 | Miðbýarætlan - Steinatún | 13074 |
| 135/16 | 16/01469-1 | NFG17 – Atkomuhæddin | 13078 |
| 136/16 | 15/01465-2 | Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir. | 13080 |
| 137/16 | 15/05000-1 | Søla bygningur matr. nr. 320a. ( Hugskotið ) | 13086 |
| 138/16 | 16/01556-1 | Bankabygningur Niels Finsensgøta. Útleigan av atkomuhædd og part av kjallarahædd. | 13088 |
| 139/16 | 16/01557-4 | Høli í Tórsgøtu 16, eru lýst til útleigan. Freist at søkja 06.05.2016. | 13091 |
| 140/16 | 16/01842-1 | Tjaldurs Apotek. Leigumál í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu. | 13094 |
| 141/16 | 16/01841-1 | Visit Tórshavn. Leigumál í bankabygninginum. Niels Finsensgøta. | 13095 |
| 142/16 | 16/01698-2 | Leigusáttmáli. Pæsastova. Matr. nr. 66, Tórshavn. Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli | 13096 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 143/16 | 16/01438-5 | Støðutakan til, um Tórshavnar havn skal brúka grundøkið undir neystinum hjá Havnar Róðrarfelag, ella leingja leigusáttmálan. | 13097 |
| 144/16 | 14/00772-13 | Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036) | 13099 |
| 145/16 | 15/01815-7 | Søla vinnustykki undir Kongavarða - partur av matr. nr. 255a | 13104 |
| 146/16 | 16/00706-3 | Keyp av lendi. Atkoma til útstykking Oman Gil. Partur av Klingruni. | 13105 |
| 147/16 | 15/00969-1 | Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði | 13107 |
| 148/16 | 16/01832-1 | Keyp av lendi. Atkomuvegur til Kirkjugarðin í Hoyvík v.m. | 13111 |
| 149/16 | 14/00323-8 | Umsókn um at rætta upp á matriklarnar litra og matr. 683i Stoffalág 33 Tórshavn | 13112 |
| 150/16 | 16/01392-2 | SEV: Umsókn um lendi og broyting av byggisamtykt til víðkan av Sundsverkinum | 13114 |
| 151/16 | 16/00407-3 | Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík | 13116 |
| 152/16 | 14/01987-3 | Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv á Argjum - Argir Bakkagøta og Argjaboða, smb. spillivatnsætlan | 13118 |
| 153/16 | 15/01396-2 | Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt | 13120 |
| 154/16 | 16/01591-1 | Framflytingar roknskaparárið 2015 | 13122 |
| 155/16 | 16/00040-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016 | 13127 |

## ***125/16 Mál beind í nevndir 2016***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 5/16 | 16/00042-1 |
| 2 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 34/16 | 16/00042-1 |
| 3 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 69/16 | 16/00042-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 97/16 | 16/00042-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 125/16 | 16/00042-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið til eftirtektar.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13041 |
| | Formansins merki: |

# 126/16 Uppsamlingsmál ár 2016 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 126/16 | 16/01984-1 |

**Málslýsing:**

Elin Lindenskov hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13042<br>Formansins merki: |

# 127/16 Frítíðarskúlin opin arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, og frítíðartilboð til børn í 3. flokki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 4/14 | 14/01009-29 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 59/14 | 14/01009-29 |
| 3 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 80/14 | 14/01009-29 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.05.2014 | 124/14 | 14/01009-29 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 148/14 | 14/01009-29 |
| 6 Fíggjarnevndin | 06.06.2014 | 160/14 | 14/01009-29 |
| 7 Býráðsfundur | 16.06.2014 | 129/14 | 14/01009-29 |
| 8 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 157/14 | 14/01009-29 |
| 9 Mentamálanevndin | 03.07.2014 | 161/14 | 14/01009-29 |
| 10 Fíggjarnevndin | 03.07.2014 | 210/14 | 14/01009-29 |
| 11 Býráðsfundur | 03.07.2014 | 160/14 | 14/01009-29 |
| 12 Mentamálanevndin | 03.09.2014 | 164/14 | 14/01009-29 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 158/15 | 14/01009-29 |
| 14 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 88/16 | 14/01009-29 |
| 15 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 129/16 | 14/01009-29 |
| 16 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 105/16 | 14/01009-29 |
| 17 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 127/16 | 14/01009-29 |

**Málslýsing:**

Áheitan komin frá foreldraráðnum fyri frítíðarskúlarnar í Tórshavnar kommunu um at hava opið arbeiðsdagar, tá skúlin er stongdur, harumframt heita tey á kommununa um at víðka frítíðarskúlan til eisini at fevna um 3. flokk.

Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at frítíðarskúlin hevur opið dagar, tá skúlin er stongdur og er komin til ta niðurstøðu, at frítíðarskúlin hevur opið 2., 3. og 4. apríl og 10. til og við 13. apríl. Opið er í summar frá 2. juli til og við 20. juli og eina viku í heystfrítíðini. Harumframt skulu frítíðarskúlarnir hava opið 3 dagar afturat, har hin einstaki frítíðarskúlin lagar seg eftir skúlanum, hann er tengdur at. Mælt verður til, at frítíðarskúlarnir leggja saman í summarfrítíðini og aðrar skúlafrídagar, tá til ber at leggja saman, so øll tey, ið hava tørv á frítíðarskúla, fáa tilboð. Nevndu dagar hevur frítíðarskúlin opið frá kl. 08.00 til 17.00. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at samskipa, hvussu frítíðarskúlarnir hava opið í mun til tørvin. Skipanin verður endurskoðað eftir heystfrítíðina 2012.

Mettur kostnaður at víða upplatingartíðina er kr. 350.000 um árið. Peningurin fer av játtanini hjá dagrøktini, ið leyp av í fjør, orsakað av, at dagrøktin ikki hevði fult tal av børnum í mun til normeringina. Tað er uppgávan hjá frítíðarskúlunum at halda seg til játtanina, ið er sett av til endamálið.

Sum nevnt omanfyri, heita foreldraráðini á Tórshavnar kommunu um at víða frítíðarskúlan til eisini at vevna um 3. flokk. Umsitingin hevur kannað møguleikan og hevur í hesum sambandi havt samband við frítíðarskúlarnar. Ætlanin er at bjóða børnunum í 3. flokki líknandi tilboð, sum vit bjóða í Margarinfabrikkini, t.v.s. eitt frítíðartilboð. Eitt frítíðartilboð hevur nøkulunda tað sama at bjóða sum ein frítíðarskúli, við verkstøðum, ítrótti og møguleika við spæli yvirhøvur. Børnini, ið taka av hesum tilboði ganga frá skúla sjálvi og verða ikki skrásett uppá á sama

máta, sum í frítíðarskúlanum. Frítíðarskúlarnir eru ymiskir, t.d. hava vit ein náttúrufrítíðarskúla í Havnardali, við djórum og fríari náttúru. Aðrir frítíðarskúlar hava góða møguleikar fyri ítrótti.

Í løtuni ganga 626 børn í frítíðarskúla, taka vit ein árgang eru tey um 300, tekur helmingurin av børnunum úr 3. flokki av tilboðnum, verða útreiðslurnar frá 15. august kr. 896.250 til 1. januar 2013. Útreiðslurnar til 3. flokk t. v. s. tímar til starvsfólk og rakstur yvirhøvur, eru helmingurin av tí, tær eru til 1. og 2. flokk í frítíðarskúla.

Í flestu førum rúmast børnini í verandi frítíðarskúlum, men neyðugt verður at útvega hølir í ovari parti av býnum. Mettar útreiðslur til leigu fyri 1 ár eru kr. 200.000. Útreiðslur til útgerð og tilfar er kr. 200.000.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri børn og ung mæla mentamálanevndini at játta kr. 350.000 av konto 3101 hjá Dagrøktini til frítíðarskúlarnar í sambandi við at tey hava opið skúlafrídagar. Eisini verður mælt til at játta kr. 896.250 til rakstur og kr. 400.000 til húsaútreiðslur, útgerð og tilfar til frítíðartilboð fyri børnum í 3. flokki. Peningurin verður játtaður av kontu 3215 sparingar í sambandi við verkfallið.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Rúni Djurhuus taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið til kunningar.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 6. februar 2013:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram eftirmeting til umrøðu.

**Mentamálanevndin 5. juni 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Við knøppu tíðini í huga og teim óvissum um, hvørt kommunan klárar at hava høli tøk til frítíðarskúla til 3. flokk í allari kommununi, eins og at arbeitt verður við endurskoðan av stovnsøkinum, verður mett skilabest fyribils at halda fram við verandi frítíðartilboðið til 3. flokk komandi skúlaár.

Tó verður mett, at ein arbeiðsbólkur umboðandi stovnar, foreldur og umsiting eigur at verða settur beinanvegin at viðgera møguliga alternativa skipan enn størri frítíðarskúli, t.d. klubbatilboð til nakrar skúlaárgangir í allari kommununi, t.d. 3.-5 flokk, og at hetta verður latið mentamálanevndini í seinasta lagi 1. november 2013.

Higartil hevur einki foreldragjald verið galdandi fyri tilboðið til 3. flokk, undantikið eitt tilmeldingargjald á 400 kr. við skúlaársbyrjan. Á Velbastað og í Nólsoy hevur frítíðarskúlin havt vanligt frítíðarskúlatilboð til 3. flokk samsvarandi samanleggingaravtaluni, tá kommunurnar

løgdu saman, við somu starvsfólkanormering og sama gjaldi sum frítíðarskúli fyri 1.-2. flokk. Klagað er um henda mun í gjaldinum. Margarinfabrikkin hevur eisini havt børn úr 3. flokki, tó er onnur skipan galdandi, har hesi rinda 400 kr. um árið sum limagjald.

Til tess at fáa greiðari mynd av tørvinum og veruliga brúkinum, er fyrimunur at hava eitt foreldragjald á sama hátt sum á stovnsøkinum annars. Við støði í normeringini kundi gjaldið verið umleið 400 kr. um mánaðin. Tað krevur, at øll børnini við skúlaársbyrjan velja og verða skrásett til ávísan frítíðarskúla. Ikki allir frítíðarskúlar koma at hava tilboð til 3. flokk vegna plásstrot. Við hesum ber heldur ikki til at ganga á fleiri frítíðarskúlum í senn, so sum uppleggið til skipanina annars var.

Støða skal takast til, um slíkt mánaðarligt foreldragjald til hetta tilboð skal hava somu rættindi til fíggjarligt frípláss og systkinaavsláttur sum vanligi frítíðarskúlin. Verður tilboðið til 3. flokk mett sum ansingartilboð, so má metast, at foreldur hava rætt til bæði fíggjarligt frípláss sambært dagstovnalógini § 6 og systkinaavsláttur sambært upptøkureglunum § 12. Á sama hátt verða reglurnar um 2 mánaðar freist at siga upp plássið galdandi.

Verður tilboðið mett sum virkistilboð á sama hátt sum Margarinfabrikkin, kann støðan í útgangsstøðinum metast vera ein onnur. Virkistilboð í frítíðarskúlunum kann skipast við mánaðarligum foreldragjaldi, men uttan rætt til fíggjarligt frípláss, systkinaavsláttur og uttan skyldu um 2 mánðarar uppsagnartíð við gjaldi. Tað er tá meira upp til, hvat tænastustøði býráðið ynskir at veita í mun til gjøld. Gerast skal vart við, at frítt er at velja frá tilboðið til 3. flokk í frítíðarskúlunum og heldur brúka tilboðið hjá Margarinfabrikkini. Harumframt er spurningur, um tilboðið til 3. flokk á Velbastað og í Nólsoy skal skipast á sama hátt sum í frítíðarskúlum í kommununi annars, ella um haldast skal fast við skipanina, sum avtalað er í samanleggingini millum kommunurnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at verandi frítíðartilboð til 3. flokk heldur fram komandi skúlaár, og at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til klubbatilboð sum alternativa skipan. Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla harumframt til at áseta foreldragjald uml. 400 kr. um mánaðin til virkistilboð ætlað næmingum í 3. flokki á frítíðarskúlum.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Samtykt at halda fram við verandi tilboð til 3. flokk restina av álmanakkaárinum uttan foreldragjald, at børnini verða skrivað til ávísan frítiðarskúla, at settur verður arbeiðsbólkur at gera uppskot til frítíðartilboð til børn í aldursbólkinum 3. flokk og eldri og at hetta arbeiðið verður samskipað við endurskoðanina av stovnsøkinum sum heild.

- Upplegg um frítíðartilboð til børn 3. flokk og eldri verður lagt fram.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Umrøtt og avgjørt at skipa ein temadag um frítíðarskúlaøkið í Tórshavnar kommunu 5. mars 2014, kl. 12.00.

**Ískoyti:**
Notat verður lagt fram á fundinum.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at útvega neyðuga játtan til framhald av verandi frítíðartilboði til 3. flokk skúlaárið 2014/15, og at arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til frítíðar- og virkishús í býarpørtum eftir leisti líknandi sum Margarinfabrikkin at seta í verk í 2015.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til fígging av frítíðartilboðnum til 3. flokk fíggjarárið 2014. Harumframt samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til at skipa verkætlanartilgongd í sambandi við arbeiðið at gera uppskot til heildarætlan um frítíðar- og virkishús til børn og ung at seta í verk august 2015.

**Ískoyti:**
Á kontu 3215 aðrar útreiðslur barnaansing eru játtaðar kr. 1.150.000 til frítíðartilboðið ætlað 3. flokki í 2014. Skúlaárið 2013/14 eru 84 børn innskrivaði, við støði í eindarkostnaðinum kr. 16.092 er samlaði rakstrarkostnaðurin fyri árið kr. 1.351.728.

Fíggjartørvur er sostatt kr. 201.728.

Møguleiki er at fíggja hetta við foreldragjaldi. Sum skipanin er nú, er bert eitt árlig foreldragjald kr. 400. Um foreldragjald var ásett 25% av rakstrarkostnaðinum (ca. 16.000 pr barn árliga, tvs. foreldragjald uml. 400 kr. um mðr. í 10 mðr), fáast uml. kr 350.000 til vega fyri tey børn, sum hava hoyrt til frítíðarskúlarnar, men ikki Margarinfabrikkina. Hetta reisir spurningin, skulu børnini í triðja flokki, sum halda til í Margarinfabrikkini, eisini gjalda foreldragjald.

Fyrimunur við foreldragjaldi er fastari skipan/stýring, skráseting í ChildCare-skipanini sum øll hini børnini. Hetta gevur eisini neyvari mynd av, hvør nýtslan ella tørvurin reelt er og harvið útreiðslustøðið. Eitt so lágt foreldragjald hevur tó avleiðingar fyri systkinaavsláttraskipanina. Møguleiki er at áseta, at foreldragjaldið er ikki fevnt av rættindum um systkinaavsláttur og fíggjarlig frípláss.

Møguleiki er eisini at fíggja upphæddina innanfyri karmarnar á grein 3 kontu 3213 systkinaavsláttur minninýtsla frá 2013.

**Inklusión, børn við serligum tørvi:**
Kommunan hevur fingið fleiri fyrispurningar og áheitanir frá fólki við børnum, sum hava serligar avbjóðingar, tí higartil hevur játtanin til serligan tørv ikki fevnt um hetta tilboðið vísandi til, at talan er ikki um frítíðarskúla sambært dagstovnalógini.

Uppá fyrispurning frá kommununi um henda praksis svarar løgfrøðiligi ráðgevin hjá Kommunufelagnum, at kommunan hevur neyvan eina desideraða skyldu til at veita brekaðum somu tænastu, sum kommunan hevur eftir § 5 í dagstovnalógini. Hinvegin er talan um eitt tilboð, sum hevur líkheit við tilboð eftir dagstovnalógini. Haraftrat er praksis hjá kommuni eitt sindur øvugt av ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sum eisini er galdandi fyri Føroyar. Hóast hesin sáttmáli ikki ásetir ítøkiligu rættarstøðuna beinleiðis – har má man bíða eftir lóggávu – so er tað partur av góðum fyrisitingarskikki at royna at halda seg til andan í hesum sáttmála, og har sær tað ikki so gott út, at frítíðartilboðini hjá kommununi ikki fevnir um tey, sum bera brek. Inkludering og sektorábyrgd (tvs. tey brekaðu eiga at fáa tilboðið frá tí myndugleika, sum veitir tænastuna) eru sentral í hesum høpi, sigur hann.

Hann reisir eisini spurningin um, hvørjar hjálpartænastur, ið Almannaverkið longu nú veitir hesum barninum í 3. flokki. Um tað longu hevur stuðul, hví kann stuðulin so ikki fylgja við til viðkomandi fríðtíðartilboð hjá kommununi heldur enn, at kommunan skal seta tað sama uppá beinini fyri nógvar pengar?

Samanumtikið sær hann ikki nakra formliga lógarskyldu, men kortini eina røð av argumentum, ið hava meira og minni løgfrøðiligan relevans, sum tala fyri, at eisini børn við breki eiga at inkluderast.

**Fleiri frítíðarskúlar:**
Klagur eru eisini frá foreldrum um, at tann frítíðarskúli, har teirra barn gongur í frítíðarskúla í 2. flokki, ikki hevur tilboðið til 3. flokk. Hetta skyldast plásstrot. Skulu fleiri høli fáast til vega, verður hetta at kosta meira í leiguútreiðslum, sum hædd er ikki tikið fyri í kostnaðarmetingini omanfyri. Tó er tikið við leigukostnaðurin av Immanuel.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at áseta eitt foreldragjald 25% av rakstrarkostnaðinum, alternativt til hetta at játta kr. 210.000 av kontu 3213 systkinaavsláttur. Harumframt verður mælt til prinsippiella støðutakan til inklusiónsspurningin.

**Mentamálanevndin 15. mai 2014:** Samtykt at áseta foreldragjald 25% av rakstrarkostnaðinum til frítíðartilboðið til 3. flokk bæði í frítíðarskúlum og Margarinfabrikkini. Harumframt samtykt at heita á umsitingina um beinanvegin at taka upp samráðingar við landsmyndugleikarnar um skipan við stuðlum hjá børnum við serligum tørvi í sambandi við frítíðartilboðið eitt nú við atliti at, at peningurin fylgir barninum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 06. juni 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein samtykkja, at verandi frítíðarskúlatilboð heldur fram fíggjarárið 2014 út við foreldragjaldið áljóðandi 25% av rakstrarkostnaðinum og at leggja málið fyri býráðið.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við mentamálanevndini vísandi til, at talan er ikki um eitt skipað tilboð fyri alla kommununa, og kommunan ikki hevur tikið støðu til, um 3. flokkur yvirhøvur skal umfatast av frítíðarskúlatilboði.

**Býráðsfundir 16. juni 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Málið umrøtt. Trivnaðarstjórin sendir nevndini uppskot til loysn.

**Ískoyti:**
Áheitanin frá mentamálanevndini á trivnaðarstjóran um uppskot til loysn verður fatað sum prinsippiel støðutakan til, at børn við serligum tørvi, sum taka lut í frítíðartilboðnum til 3. flokk, skulu hava í minsta lagi somu treytir til stuðul og ráðgeving, sum tey, ið ganga í vanligum frítíðarskúla. Uppskotið til loysn er tí við støði í hesum.

Kommunan hevur tvær høvuðsfyriskipanir til børn við serligum tørvi. Onnur fyriskipanin er, stovnar kunnu søkja um námsfrøðiliga ráðgeving frá ráðgevaratoyminum hjá barna- og ungdómsdeildini til eitt ávíst barn í samráð við foreldrini. Hin fyriskipanin er, at tá eitt barn hevur tørv á ávísum námsfrøðiligum tiltaki, sum krevur fleiri resursir enn tær, sum vanliga eru á stovninum, kann stovnurin í serligum førum søkja um eyka tímar (fígging til øktan starvsfólkatørv).

Í fíggjarætlanini er námsfrøðiliga ráðgevingin fíggjað á kontu 3211, meðan tímarnir til stovnarnar verða játtaðir av kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv. Umsitingin metir, at umleið 10-12 børn við serligum tørvi væntast at taka av frítíðartilboðnum til 3. flokk næsta skúlaár. Fyri tíðarskeiðið august-desember 2014 verður hetta mett at kosta uml kr. 300.000 kr.

Mett verður, at økt virksemi í mun til 3. flokk fær ikki stórvegis avleiðingar fyri fíggjarstøðuna á kontu 3211 Námsfrøðiliga ráðgevingin, men fíggjarstøðan á kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv loyvir ikki at økja um virksemið til 3. flokk eisini.

Nýtslan á kontu 3212 hevur síðstu árini verið vaksandi, uttan at játtanin hevur fylgt við tørvinum í sama mun. Úrslitið er ein framflutt meirnýtsla frá 2013 uppá kr. 552.000, og framroknað meirnýtsla fyri 2014 er kr. 775.00, sum hædd má takast fyri í fíggjarætlanin 2015.

Til tess at tálma vøksturin hevur umsitingin gjørt av at eftirhyggja fyriskiparnirnar bæði í mun til treytir um tørv, áðrenn tímar verða játtaðir, og um tímarnir kunnu gagnnýtast betri. Hetta væntast liðugt í heyst sum íkast til fíggjarætlanarviðgerðina.

Í mun til børnini í 3. flokki, so ber til at játta eykafígging til hetta økta virksemið august-desember 2014, og at hædd annars verður tikin fyri hesum í fíggjarætlanini 2015.

Vísandi til, at eingin nýtsla higartil hevur verið á kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing, verður mett møguligt at játta kr. 300.000 av hesi kontu til økta virksemið í sambandi við frítíðartilboðið til 3. flokk fyri tíðarskeiðið august-desember 2014.

Trivnaðarnevndin og mentamálanevndin vara av hesi kontu, eins og hesar báðar nevndr vara av kontu 3211 Námsfrøðiliga ráðgeving og kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv. Skal eykafígging játtast av kontu 3210 og skulu fyriskipanirnar til børn við serligum tørvi víðkast til frítíðartilboðið til 3. flokk eisini, eiga báðar nevndir at samtykkja tað, áðrenn tað fer í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til,

- at fyriskiparnirnar námsfrøðilig ráðgeving og tímar vegna serligan tørv eisini fevna um børn við serligum tørvi í frítíðartilboðnum til 3. flokk,
- at tað í hesum sambandi verða játtaðar kr. 300.000 av kontu 3210 Hjálp vegna vantandi barnaansing til kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv fyri tíðarskeiðið august-desember 2014, og
- at hædd verður tikin fyri hesum í fíggjarætlanini 2015.

Ein meiriluti í trivnaðarnevndini: Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen tóku um teldupost undir við tilmælinum og formliga góðkenna á fyrst komandi fundi í trivnaðarnevndini. Marin Katrina Frýdal og Annfinn Brekkstein hava ikki svarað.

Ein meiriluti í mentamálanevndini: Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Tróndur Sigurðsson tóku um teldupost undir við tilmælinum og formliga góðkenna á fyrst komandi fundi í mentamálanevndini. Bogi Andreasen og Jógvan Arge hava ikki svarað.

**Mentamálanevndin 03. juli 2014:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen og Elin Lindenskov, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 03. juli 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at tilboðið er galdandi fíggjarárið 2014 og at beina málið í býráðið.

Harumframt víst til samtykt í mentamalanevndini 15. mai 2014 um samráðingar við landsmyndugleikarnar.

**Býráðsfundir 03. juli 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt í mentamálanevndini 7. mai 2014 um heildarætlan fyri frítíðar- og virkishús til børn og ung verða lagdar fram metingar um rakstrarkostnað.

**Mentamálanevndin 3. september 2014:** Umrøtt. Nevndin heitir á fyrisitingingina um at kanna hvussu býráðssamtyktin 3. juli 2014 verður útint.

**Ískoyti:**
Frítíðartilboðið til 3. flokk í skúlanum á Argjahamri hevur í ár hildið til í lærarastovuni. Skúlin ynskir ikki hesa loysn at halda fram. Pláss er ikki í frítíðarskúlanum, nú forskúli eisini er aftrat 1.-2. flokki.

Frítíðarskúlin hevur víst á fyribil loysn til næsta skúlaár í skúlanum. Komandi 3. flokkur hevur bert 25 næmingar og brúkar eitt flokshøli. Stovan hinumegin flokshølinum hjá flokkinum er tómt. Einasta stig, ið skulu gerast, er at gera hølini klár, m.a. at skifta okkurt skúlainnbúgv út við frítíðarinnbúgv.

Skúlin er ikki sinnaður til hesa loysn, og vísir á, at skúlin er góðkendur sum 2-sporaður skúli. Til ber ikki at taka eina floksstovu burturúr, tí undirvísingin krevur fleiri møguleikar fyri arbeiðsplássi, og ein flokkur-ein stova er ikki longu galdandi, men at fleiri møguleikar skulu verða í boði til hvønn flokkin. Eisini verður víst á, at fyrispurningur er um at fáa næming inn í 3. flokk. Skúlin ynskir ikki enn eina “hovsaloysn”, tí tað hevur havt ómetaliga keðiligar avleiðingar fyri starvsfólkasamstarvið á stovnunum báðum. Eisini vísir skúlin á, at møguligar bygnaðarbroytingar í skúlanum skulu viðgerast í skúlastýrinum.

Mett verður ikki, at talan er um formella bygnaðarbroyting, men um annað brúk av skúlans hølum í eitt styttri tíðarskeið.

Um tilboðið til 3. flokk ikki skal vera í skúlanum á Argjahamri, so eru alternativini hesi:

- At kommunan leigar AB-húsið til 3. flokk undir leiðslu av frítíðarskúlaleiðaranum á Argjahamri. Fyrimunur er, at hetta er á Argjum. Vansi er, at frítíðarskúlin skal deila hølini við AB, og at fígging skal til keyp av útbúnaði og klárgering. Flokkurin er bert 25 næmingar, og normeringin ber ikki tvey starvsfólk, so neyðugt er við meirnormering. Um ikki øll melda til, men bert t.d. 15, so krevst ein eykafígging til normering uppá uml. kr. 175.000, og fíggjarliga er hetta viðkvæmt í mun til sjúkrameldingar og harvið fíggjartørv til vikar. Møguliga er neyðugt við skipaðum flutningi, tað er uml. 1,5 km at ganga niðan, har opið er fyri vindi og veðri. Kostnaðurin av hesum ógreiður.

- At 3. flokkur fer í Spíran í Havnardali. Fyrimunur er, at hetta er í regi av frítíðarskúlanum í Hornabø og ávirkar ikki eyka normeringstørv til starvsfólk annað enn barnatalið. Fyrimunur er eisini, at alt er klárt. Vansi er, at neyðugt er við skipaðum flutningi av Argjahamri til Spíran í Havnardali. Við støði í kostnaðinum til flutning Hornabø-Spírin, skal roknast við fíggjartørvi til flutning uppá uml. kr. 100.000.

- At 3. flokkur fer í Margarinfabrikkina. Fyrimunur er, at tað krevur ikki nakað eyka til klárgering ella eyka starvsfólkanomering annað enn barnatalið. Vansi er, at Margarinfabrikkin er ikki frítíðarskúli, og 3. flokkur á Argjahamri verður tí einasti flokkur, sum hevur frítíðaritlboð uttan fyri regi av frítíðarskúlunum. Hinvegin er Margarinfabrikkin pedagogiskur stovnur. Fyrimunur er eisini, at bussleiðin koyrir av Argjahamri til miðbýin ókeypis.

Loysnin á Argjahamri og í Margarinfabrikkini hevur ikki tørv á meirfígging. Loysnin á Argjahamri er mest uppløgd fyri næmingarnar og fíggingina, eisini normeringar, men skúlin ynskir ikki hesa loysn í mun til skúlavirksemið. Loysnin í Spíranum kostar í flutningi. Loysnin í AB-húsinum krevur eyka normering.

Síðani frítíðartilboðið til 3. flokk varð skipað, hava á hvørjum ári verið trupulleikar við hølisviðurskiftum. Setast eigur í kortið ein varandi loysn hesum viðvíkjandi, áðrenn skúlaárið 2016/2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla í fyrsta lagi til loysn á Argjahamri, í øðrum lagi til loysn í Spíranum í Havnardali treytað av játtan til bussflutning.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um hølisloysn á Argjahamri.

**Ískoyti:**
Barna- og ungdómsdeildin hevur saman við avvarðandi frítíðarskúlaleiðarum tikið saman um royndirnar við frítíðartilboðnum til 3. flokk og mett um, hvussu tilboðið skal skipast framyvir, harundir tørvin á varandi hølisloysnum. Sí skjal: «Eftirmeting av verandi frítíðartilboðum til 3. flokk og boð uppá varandi hølisloysnir.»

Boð uppá varandi loysnir eru:
- Byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út eisini til ungdómstilboð
- Flyta ella skipa Spíran á øðrum náttúrustað

- Byggja frítíðarskúlan í Badmintonhøllini út til 3. flokk
- At flyta tilboðið í Hoyvík inn í frítíðarskúlan í Hoyvík
- Margarinfabrikkin hevur framhaldandi tilboð eisini til 3. flokk
-

Til komandi skúlaár verður lagt upp til hesar hølisloysnir:
- Tilboðið heldur fram í skúlanum á Argjahamri, men nýggj hølisloysn má finnast
- Tilboðið í Spíranum heldur fram
- Tilboðið í KFUM heldur fram, møguliga knýtt at leiðsluni í Badmintonhøllini
- Tilboðið í Hoyvík verður flutt inn í frítíðarskúlan í Hoyvík
- Margarinfabrikkin hevur framhaldandi tilboð eisini til 3. flokk

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til umrøðu av eftirmetingini og støðutakan til a) uppskot til varandi hølisloysnir og b) hølisloysnir til komandi skúlaár.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við omanfyri standandi loysnum fyri næsta skúlaár. Harumframt verður mælt til at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við útbyggingini av fimleikahøllini, og at kanna møguleikan fyri at byggja Badmintonhøllina út til frítíðarskúlaendamál og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt um at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við útbyggingini av fimleikahøllini.

Í sambandi við, at fimleikarhøllin verður bygd út til ítróttahøll, er møguleiki at byggja frítíðarskúlan út samstundis. Sum bygningspartar eru teir sambygdir.

Verkætlanin við at byggja ítróttahøllina er samtykt, og síðsta hond verður lagt á prosjektering v.m. Skal útbyggingin av frítíðarskúlanum knýtast uppí uttan at órógva byggingina av ítróttahøllini, skal avgerð takast um tað beinanvegin, eins og tað at koma afturumaftur seinni verður munandi dýrari.

Í mun til barnatalið, ið er á stovninum nú, er hann ov lítil. Frítíðarskúlin er bygdur til tveir árgangir. Við forskúla og triðja flokki eru reelt fýra árgangir knýttir at frítíðarskúlanum. Umframt at loysa upp fyri hesum, kann útbyggingin tryggja høli til ungdómsklubb-tilboð á Argjum eftir sama leisti sum í t.d. Hoyvík.

Talan er um møguleika at byggja 130 m2 aftrat. Kostnaður at inniloka endan (rábygning uttan vindeygu v.m.) er mett til uml. kr. 150.000. Innrætting, tekniskar installatiónir og klárgering vm. verður mett at kosta kr. 1,6 mió.

Í mun til at fáa tryggjað, at útbyggingin av rábygninginum kann fremjast saman við ítróttahøllini, skulu kr. 150.000 játtast til endamálið. Hetta kann fíggjast við at flyta part av minninýtslu hjá frítíðarskúlanum á Argjahamri konta 3142 til íløguverkætlanina. Støðutakan til fígging av innrætting v.m. kann takast uppaftur seinni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina og mentamálaleiðarin mæla til at byggja frítíðarskúlan á Argjahamri út saman við byggingini av ítróttahøllini. Til tess í fyrsta umfari at fáa bygt rábygningin verður mælt til at játta kr. 150.000 av kontu 3142 frítíðarskúlin á Argjahamri til íløgukontu 5775 L57025 útbygging av høllini í skúlan á Argjahamri.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið sum eykajáttan at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 128/16 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 m², til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 m² og 20.000 m².

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.

Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:

| | | |
|---|---|---|
| 11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri | 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= | 232.000.000 kr. |

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13059 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 129/16 Kvøldskúlin - hølisviðurskifti

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 56/14 | 14/01802-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 70/14 | 14/01802-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.05.2014 | 119/14 | 14/01802-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 109/14 | 14/01802-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 182/14 | 14/01802-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 213/14 | 14/01802-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 216/14 | 14/01802-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 227/14 | 14/01802-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 04.03.2015 | 54/15 | 14/01802-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 53/15 | 14/01802-1 |
| 11 Býráðsfundur | 19.03.2015 | 42/15 | 14/01802-1 |
| 12 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 69/15 | 14/01802-1 |
| 13 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 103/15 | 14/01802-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 20.05.2015 | 128/15 | 14/01802-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 134/15 | 14/01802-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 15.06.2015 | 162/15 | 14/01802-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 22.06.2015 | 182/15 | 14/01802-1 |
| 18 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 130/15 | 14/01802-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 110/16 | 14/01802-1 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 120/16 | 14/01802-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 157/16 | 14/01802-1 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 129/16 | 14/01802-1 |

**Málslýsing:**

**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

Sigrun Mohr varð ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**

Býráðið keypti í mai 2013 ovaru sjónvarpsbygningarnar í Vørðsluni, t.e. matrikklarnar 537b, 538b og 538a. Ætlan við hesum var at savna størri part av Kvøldskúlavirkseminum har. Í sambandi við keypið varð greitt, at bygningarnir tørvaðu ábøtur.

Kvøldskúlin hevur ynski um at taka partar av bygningunum í nýtslu sum skjótast, og hevur skotið upp, at framflyting av rakstri hjá kvøldskúlanum kr. 1,5 mió verður brúkt til at gera klár høli til tónleik og veving. Hetta vísir seg tó ikki at vera so lætt at fremja.

Arkitektavirki hevur gjørt skitsuppskot til innrætting av bygningunum til kvøldskúla eins og kostnaðarmeting fyri umvælingum v.m. frá oktober 2013, samlað mett til uml. kr. 8,5 mió við øllum. Tekniska fyrisiting tekur stór fyrivarni við hesi kostnaðarmeting m.a. vísandi til, at talan er um renoveringsprojekt, og kostnaðarmetingin tí er uml. 13 mió umframt mvg, ókent og ráðgeving. Til at koma víðari verður mett neyðugt við neyvari prosjekteringsgrundarlagi og heildarætlan viðvíkjandi bygningunum.

Annað ivamál eru útreiðslur í sambandi við brúnna yvir um M.A. Winthersgøtu. Ynski hjá Starvsmannafelagnum er at taka hana niður í summar, men bygningurin hjá

Starvsmannafelagnum veitir ognini hjá Tórshavnar kommunu streym. Hetta er ikki vanlig mannagongd, og støða skal tí eisini takast til nýggja streymleiðing.

Harumframt er í frágreiðing staðfestur soppur í bygninginum. Tilráðing frá teknisku fyrisiting er ikki at taka bygningin í brúk til kvøldskúla, fyrr enn soppatrupulleikin er loystur.

Tá so er, er at meta nyttuleyst at brúka 1,5 mió uppá innrættingar júst nú. Heldur eigur arbeiði at vera sett í gongd at útgreina, hvat loysir seg best at gera, hvat skal gerast av funktiónsmessigum ávum, og hvat kostnaðurin verður.

Mett verður, at fyrireikandi arbeiðið fer at kosta uml. kr. 150.000. Eingin játtan er sett av á íløguætlanini til kvøldskúlan. Mett verður ikki rætt, at kvøldskúlin av rakstri rindar fyri projektfyrireikingar, og tí eigur játtan at verða fingin til vega um íløguætlanina.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og tekniski stjóri mæla til at játta kr. 150.000 til:

- At gjørd verður byggitøknilig støðulýsing at fáa greiðu á, hvørjir bygningslutir mugu høvuðsumvælast ella skiftast
- At gjørd verður kravspesifikatión viðvíkjandi nýtslu, hølum o.l. í samstarvi við kvøldskúlan, umframt byggitøknilga kravspesifikatión og myndugleikakrøv
- At gjørd verður umvælingarætlan í stigum, innihaldandi tíðarætlan og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri fígging at seta í verk byggiætlanina.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Nevndin samtykti at heita á fíggjarnevndina um at selja bygningarnar.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, mælir til, at gjørd verður heildarætlan fyri bygningarnar.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin 10. apríl 2014 og játta kr. 150.000 av kontu 5210 Tórshavnar-, Ungdóms- og Listaskúla til endamálið, og at nevndin hevur ástaðarfund til komandi fund.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Nevndin var á ástaðarfundi í Kvøldskúlanum. Nevndin heitir á umsitingina um at gera uppskot til stigvísa umvæling og innrætting av hornahúsinum og høvuðsbygninginum, herundir kostnaðarmeting til næsta fund.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til umbyggingar- og umvælingarætlan av hølum og bygningum hjá Kvøldskúlanum í Vørðsluni og M.A. Winthers gøtu.

Við støði í nýggjari inniklimafrágreiðing verður mælt til, at drenað verður um húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og um húsini í Vørðsluni 4, umframt at bróta gólvið upp, har sum vesini eru á hædd 1 í Vørðsluni 4. Garðurin millum húsini í M.A. Winthers gøtu 1 og Vørðsluna 4 skal eftir ætlan takast niður, og viðurskiftini við septiktanga gerast um. Hetta arbeiðið er ætlanin at bjóða út sum undirhondsboð millum tveir veitarar. Soleiðis kann hesin parturin byrja skjótast og verða fyrst avgreiddur.

Tað er ikki ætlanin at gera nakað við bygningin í M.A. Winthers gøtu 5 í hesum umfari, men verður ætlandi partur av øðrum byggistigi seinni.

-o-

Tørvurin hjá kvøldskúlanum at betra um viðurskiftini til veving er stórur. Meiri pláss skal til hetta virksemið, umframt at verandi høli í J. H. Schrøters gøtu 1 (Einars Prent) eftir ætlan skulu brúkast til aðra undirvísing, sum hølini eru betri egnaði til, m.a. til "mál og mentan fyri útlendingar", føroyskt fyri útlendingar og onnur fremmandamál, sum nú húsast í Venjingarskúlanum um kvøldarnar.

Ætlanin er, at veving skal vera í erva í Vørðsluni 4. Í niðaruhædd skal tónleikur halda til (3 smærri tónleikahøli og eitt størri studio til samanspæl). Størra hølið kann eisini brúkast til smærri tónleikartiltøk, kórvenjingar og fyrilestarar. Við hesum hevur kvøldskúlin ikki longur tørv á hølum í Margarinfabrikkini, og sum ætlandi Klippfisk, ið higartil hevur hildið til í M.A. Winthers gøtu 1, fær í staðin. Í niðaru hæddini skal umframt tónleik eisini verða tekøkur og betraði vesiviðurskifti.

Nýggj høvuðsinngongd skal verða til bygningin í Vørðsluni. Høvuðsinngongdin verður flutt at verða úr norðara enda til langsíðuna eystureftir.

Mett verður, at fígging er ikki tøk til at umvæla húsini M.A. Winthers gøtu 1 í hesum byggistigi. Her skal ætlandi glaslist verða í neðra og seymistova í erva.

-o-

Kostnaðarmeting er gjørd fyri omanfyri nevndu arbeiði, innbúgv og útgerð v.m. Útreiðslur til nýggjar útsíður á bygningin til Vørðsluna 4 eru ikki tiknar við í kostnaðarmetingina, men liggur eftir ætlan í einum øðrum byggistigi. Tað sama er við útreiðslunum at gera skitsuuppskot til eina heildarætlan fyri økið.

Ætlanin er at fíggja omanfyri nevndu umvælingar, sum eru at meta sum fyrsta byggistig, av staðfestari minninýtslu í rakstri hjá kvøldskúlanum. Tøk játtan, um øll minninýtslan pr. 31. desember 2014 verður brúkt til endamálið, er kr. 3.352.000. Umvælingarnar eru tó so umfatandi, at tær mugu metast sum ein íløga..

Byggitíðin er mett til 7-8 mðr.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á kvøldskúlanum mæla til at samtykkja uppskotið til umbyggingar- og umvælingarætlan, og til endamálið at játta kr. 3.352.000 av

rakstrarkontu 5210 Tórshavnar Kvøld-, Ungdóms- og Listaskúli til íløgukontu 5275, Kvøldskúlin.

**Mentamálanevndin 04. marts 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Sjúrður Olsen, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum at játta pening av rakstrinum til íløgur og mælir til, at umvælingararbeiðið verður boðið út sum aðrar verkætlanir av slíkum slag, og at arbeiðið verður játtað av íløgum.

Jógvan Arge tekur støðu á einum seinni fundi og ynskir frágreiðing um, hvussu hetta avlopið í rakstrinum hjá Kvøld- og ungdómsskúlanum er íkomið.

**Býráðsfundir 19. mars 2015:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge,Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Jørð- og lendisarbeiði, sum serliga hevði til endamáls at drena runt ognirnar á M. A. Winthersgøtu 1 (Hornahúsið) og Vørðsluna 4, varð boðið út sum undirhondsboð.

Inn komu tvey tilboð.

| | |
|---|---|
| Sp/f David Nordendal | 967.100,00 kr u. mvg |
| Sp/f við Sjógv | 797.812,00 kr u. mvg |

Eftir samráðingar við bíligara tilboðsgevara, eru nakrar sparingar framdar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og trivnaðarstjórin mæla til at taka av tilboðið frá Sp/f við Sjógv, á krónur 692.412,00 kr. Upphæddin er u.mvg.

**Mentamálanevndin 20. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta peningin av íløgukontu 5275, Kvøldskúlin og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015: Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.**

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at umbyggja og umvæla bygningarnar hjá Kvøldskúlanum í Vørðsluni og M.A.Winthersgøtu heldur fram.

Sáttmáli til jørð- og lendisarbeiðið er gjørdur og tað arbeiðið er í gongd. Tað sama er galdandi fyri ráðgevarapartin, har kommunan sjálv kemur at standa fyri eftirlitspartinum. Ein heildarætlan fyri innrætting av øllum trimum bygningunum (M.A. Winthersgøta 1 og 5 umframt Vørðslan 4), umframt hvussu bygningarnir skulu klæðast í framtíðini, verður klár í næstum.

Við atliti at tøku játtanini, verður tað mest neyðuga raðfest ovast íroknað tað, sum er størsti tørvurin hjá Kvøldskúlanum í mun til virksemið.

Fríggjadagin 12. juni 2015 var lisitatión uppá innrættingarpartin til ein part av Kvøldskúlanum. Bodnir vóru 4 arbeiðstakarar at geva tilboð: Karstin A. Joensen, ÁTS, Valbjørn Dalsgarð og Eysturlon.

Trý tilboð komin.

| | |
|---|---|
| Sp/f Eysturlon | 1.071.486,25 |
| Sp/f Karstin A. Joensen | 1.124.714,35 |
| Sp/f ÁTS | 1.207.256,39 |

Prísirnir eru uttan mvg.

Miðað verður ímóti at hava sáttmála til innrættingarpartin kláran í viku 25.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f Eysturlon og lata heimild til umsitingina at samráðast og gera sáttmála.

**Mentamálanevndin 15. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. juni 2015:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Kvøldskúlin hevur farnu árini fingið betri høliskarmar í økinum kring vørðsluna. Kvøldskúlin hevði umleið 1.234 tkr. í yvirskoti í 2015 og verður mett hóskandi at taka støðu til um haldast skal fram við umbygging og umvæling av ognunum hjá Kvøldskúlanum eftir sama leisti sum í fjør har yvirskot av rakstrarpeningi verður brúktur til endamálið.

Viðvíkjandi ognini í M. A. Winthersgøta 1 (Hornahúsið).
Leiðslan á Kvøldskúlanum ynskir at hava alt tað føroyska handverkið í húsinum. Tað er: Tøva, spinna, lita og garva (haruskinn, seyðaskinn og fiskaskræðu). Ein partur, tøva, lita og garva, krevur eitt vátrúm, sum ætlanin er skal vera í kjallaranum. Í løtuni lænir Kvøldskúlin vátrúm frá Tekniska skúla, men verður tað neyvan ein møguleiki, tá ið Tekniski skúli flytir í nýggja bygningin hjá Glasum í 2017. Í fyrstu hædd er ætlanin at spinna og at hava industrimaskinur til at seyma skinn og leður.

Tað kann tykjast kostnaðarmikið, at brúka eini heil sethús til nevnda virksemi, men hvør annar enn Kvøldskúlin kann halda lív í hesum handverkinum?

Tá ið húsið er liðugt umvælt, kunnu dagskeið bjóðast út til pensionistar, skúlar, barnagarðar og onnur. Tó vil húsið, um tað verður umvælt, í fyrstu siftu blíva brúkt til glaslist, til stovuhæddin í M.A. Winthersgøtu 5 er liðugt umvæld.

Mett verður at umvælingin kostar kr. 1.033.514. Tá er alt arbeiði við facadum, jørðarbeiði (grevstur og dren), el og mestsum alt innandura við í kostnaðinum.

Viðv. ognini í M. A. Winthersgøtu 5
Ætlanin er at hava glaslist (í stovuhæddini), alt innan seyming (seymistova 1 hædd) og tekning/málningalist (2hædd) í bygninginum.

Glaslist er í dag í somu hølum sum listgrafikkur. Hetta ger m.a., at skúlin ikki fær bjóða glaslist út á nøktandi hátt, tí ovnurin stendur í undirvísingarhølinum og blívur tað ov heitt at hava undirvísing yvirhøvur í hølinum. Eisini er alt ov lítið pláss. Í glaslist hevði borið væl til at havt dagskeið fyri pensionistum, barnakonum, skúlum og barnagørðum, og hevði hetta spart t.d. skúlunum fyri hesa útgerð. Í ár hava 2 skúlaflokkar frá Eysturskúlanum verið til glaslist í Kvøldskúlanum!

Á 2. hædd er ætlanin at hava seymistovu. Hetta gevur møguleika fyri dagskeiðum fyri pensionistum, barnakonum og øðrum, sum fleiri hava havt ynski um. Eisini hevur tað verið trupult, at havt seymiskeiðini til serliga fø. klæði í øðrum skúlum, tí skúlarnir fara sera illa við útgerðini hjá Kvøldskúlanum, og hevur stór ónøgd verið bæði frá undirvísara og næmingum. Enntá eru undirvísarar, sum ikki hava serliga stóran áhuga í at halda fram, um okkurt ikki verður gjørt við trupulleikan.

Á 3. hædd er ætlanin at hava tekning/málningalist. Hetta gevur eisini møguleika fyri dagskeiðum, men hetta gevur eisini fleiri aðrar møguleikar í J. H. Schrøtersgøtu 1.

Umvælingin av hvørjari hædd kostar umleið 1.100. tkr. pr. hædd. Tá eru vindeygu og hurðar við í prísinum. Við í prísinum eru ikki kr. 225 tkr. til klæðing av tveimum facadum. Hetta arbeiði má gerast áðrenn ella samstundis sum fari verður undir umvælingina av hvørjari einstakari hædd.

Tá ið bygningarnir eru umvældir, verður sum nevnt møguleiki fyri fleiri dagskeiðum í Kvøldskúlanum, sum vit merkja, at størri eftirspurningur er eftir. Henda møguleika hava vit í

dag í skeiðuum Horn og silvur, Listgrafikki og Møblapolstring í J. H. Scrøtersgøtu 1. Eisini verður í størri mun møguleiki hjá skúlum og barnagørðum at brúka hesar serstovur.

Næmingatalið hjá skúlanum á øðrum skúlum kemur at verða umleið tað sama eftir útbyggingina !

Kannað hevur eisini verið viðv. sølu av ognini. Men ber tað illa til uttan víðari. M. A. Winthersgøta 3, hevur sum fortreyt, at lyfta verður bygd í nr. 5 til tess at lúka krøv um atkomuviðurskifti í samlaða bygninginum 3-5. Um 3 verður selt frá, skal onnur loysn við atkomu/lyft gerast.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til at fyrreika verkætlan og útboð av verkætlanini í M. A. Winthersgøtu 1 og ábøtur viðv. fasadum í M. A. Winthersgøtu 5 treytað av at yvirskoti í 2015 á konto 5210 verður flutt til endamálið. Í øðrum lagi taka støðu til at gera ábøtur á fyrstu hædd í M. A. Winthersgøtu 5 og gera facadur.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Nevndin samtykti eisini at mæla til at gagnnýta nýumvældu hølini so stóran part av samdøgrinum sum møguligt. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri viðmerking, at málið kemur fyri aftur í sambandi við seinni viðgerð av framflytingum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein.

# 130/16 Eykajáttan til Heilsu- og umsorganartænastuna 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 135/16 | 16/01585-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 13.04.2016 | 23/16 | 16/01585-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 183/16 | 16/01585-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 130/16 | 16/01585-1 |
| 5 Býráðsfundur | | | 16/01585-1 |

**Málslýsing:**
Samlaða nettojáttanin til alla heilsu- og umsorganartænastuna – konta 2720 heilsuhúsið, konta 2721 røktartænastur, konta 2722 tilboð, konta 2730 fyrisiting, konta 2731 gjøld fyri røktartænastur, konta 2750 ansingarsamsýning, og konta 2761 leiga – er í 2016 kr. 140,5 mió.

Sama nettojáttan fyri 2015 var kr. 141,1 mió. Sambært roknskapinum fyri 2015 varð meirnýtslan á hesum kontum samlað kr. 9,4 mió, sí eisini niðanfyri.

Samlaða nettojáttanin til eldraøkið í Tórshavnar kommunu í 2014 var umleið kr. 136 mió, harav umleið kr. 5 mió frá kommununi. Tá 2014 varð gjørt endaliga upp, høvdu stovnar í Tórshavnar kommunu meirnýtslu uppá kr. 5-6 mió, sum landið tá endurrindaði meginpartin av.

Tað merkir, at játtanarstøðið til eldraøkið hesi trý árini er stórt sæð tað sama.

Kommunan hevur í fíggjarætlanini bæði fyri 2015 og 2016 samtykt at taka støði í teirri játtan til eldraøkið, sum landið letur kommununi samsvarandi serliga fíggingarleistinum við afturbering av frádráttum og skatti av eftirlønarinngjøldum. Í 2015 var henda játtan í fíggjarætlanini kr. 128,4 mió og í 2016 er hon sett til kr. 131,9 mió.

Harumframt er ein skiftisjáttan fyri árini 2015 og 2016. Játtanin í 2015 var kr. 8,9 mió, og í 2016 er hon kr. 4,8 mió. Í 2017 er henda skiftisjáttan burtur.

Aftrat omanfyri nevndu játtanum frá landinum er so tann upprunaliga kommunala játtanin til eldraøkið, sum áðrenn útleggingina var til rakstur á sambýlum, heimavitjanartænastu og tilhald, kr. 5,8 mió løgd aftrat. Til síðst er eisini lønarvøkstur framroknaður.

Staðfestast kann, at játtanin fyri 2015 og 2016 í upphædd er á sama støði sum í 2014. Við so at siga sama virksemi og tænastustigi á røktarheimunum og í heimatænastuni, bæði tá um tal av brúkarum og starvsfólkanormeringum annars ræður, umframt ávísum uppraðfestingum innan fyribyrging og heilsustimbran eins og visitatión, er greitt, at virksemið kann ikki rúmast innan samtykta játtanarkarmin.

**Roknskapur 2015**
Í talvuni sæst heildarroknskapur fyri heilsu- og umsorganartænastuna fyri 2015:

| Konta | Heiti | Salda 12-2015 | Játtan 2015 | Avlop kr. 12-2015 | Avlop 12-2015 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2720 | Heilsuhúsið | 31.127.000 | 29.947.000 | -1.180.000 | -4% |
| 2721 | Røktartænastur | 106.930.971 | 99.033.000 | -7.897.971 | -8% |
| 2722 | Tilboð | 21.266.334 | 18.774.000 | -2.492.334 | -13% |
| 2730 | Fyrisiting | 4.730.069 | 5.790.000 | 1.059.931 | 18% |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | -16.025.589 | -15.000.000 | 1.025.589 | 7% |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 2.312.243 | 2.300.000 | -12.243 | -1% |
| 2761 | Leiga | 174.598 | 300.000 | 125.402 | 42% |
| | Tilsamans | 150.515.624 | 141.144.000 | -9.371.624 | -7% |

**Roknskapur pr. ultimo februar 2016**
Í talvuni sæst heildarroknskapur fyri heilsu- og umsorganartænastuna fyri januar og februar 2016:

| Konta | Heiti | Salda 02-2016 | Játtan til 02-2016 | Nýtsla higartil 02-2016 | Játtan 2016 |
|---|---|---|---|---|---|
| 2720 | Heilsuhúsið | 4.781.914 | 4.699.330 | 102% | 28.196.000 |
| 2721 | Røktartænastur | 19.824.035 | 17.272.504 | 115% | 103.635.000 |
| 2722 | Tilboð | 3.217.503 | 2.707.171 | 119% | 16.243.000 |
| 2730 | Fyrisiting | 443.769 | 835.000 | 53% | 5.010.000 |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | -2.662.748 | -2.500.000 | 106% | -15.000.000 |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 393.820 | 400.000 | 98% | 2.400.000 |
| 2761 | Leiga | 0 | 22.000 | 0% | 132.000 |
| | Tilsamans | 25.998.294 | 23.436.005 | 111% | 140.616.000 |

| | |
|---|---|
| Úrslit | -2.562.289 |

Til tølini fyri januar og februar er at viðmerkja, at uml. kr. 900.000 er eftirlønargjøld hjá tímaløntum fyri 2015. Hesi verið goldin einaferð um árið. Harumframt hevur Gjaldstovan fráboðað, at lønarútlegg frá 2015 stórt kr. 561.000 verður at skráseta sum útreiðsla á kommunala roknskapinum fyri 2016. Hetta framgongur tó ikki enn av tølunum omanfyri.

Í fíggjarætlanini fyri 2016 er lagt upp til, at Umlættingarheimið varð niðurlagt pr. januar 2016. Fráboðað er nýggj politisk viðgerð av hesi avgerð við tí endamálið, at umlættingarheimið heldur fram við vanliga umlættingarvirkseminum sum áður. Fyri fíggjarætlanina 2016 merkir tað ein fíggjartørv á 3,6 mió kr.

Við støði í tveimum teimum fyrstu mánaðunum er samlaða framroknaða meirnýtslan fyri 2016 kr. 15,5 mió.

Ætlandi verða uml. kr. 2,2 mió av minninýtslum í 2015 (konturnar 2730 fyrisiting, 2731 gjøld fyri røktartænastur og 2761 leiga) framskrivaðar til 2016.

Samlaður mettur eykajáttanartørvur fyri 2016 er sostatt kr. 13,3 mió. Tá er ikki roknað við nøkrum broytingum í tænastum ella virksemi.

Sí eisini notat við ymiskum taltilfari fyri 2015 og 2016.

Uppraðfestingar?:
Omanfyri nevnda upphædd kr. 13,3 mió í eykajáttan fyri 2016 hevur ikki við sær nakrar beinleiðis uppraðfestingar ella betringar í tænastustøðinum ella víðkan av virksemi ella tilboðum, men er bert ein staðfesting av veruliga kostnaðinum av verandi virksemi.

Afturmeldingar frá deildarleiðarum og starvsfólkum búeindunum er fatan av, at normeringin í røktini er ov lág. Gongdin er, at húsfólk verða meira og meira røktarkrevjandi. Mett verður, at umleið 2/3 av húsfólkunum hava tørv á, at tvey starvsfólk hjálpa við allari persónligari røkt.

Skuldi politiskur vilji verið til at játta t.d. eina dagvakt 40 tímar út á hvørja deild á búeindunum, heimatænastuni og terapeuttoyminum, t.e. 17 ársverk við miðal lønarkostnaði á kr. 430.000, so er samlaði kostnaðurin kr. 7,3 mió.

Í mun til eldrapolitikkin var stórur dentur lagdur á fyribyrging, heilsustimbran og rehabilitering. Heimatænastan er eisini partur av hesum. Til ber við lutfalsliga avmarkaðum upphæddum at røkka nógvum heimabúgvandi borgarum við viðkomandi tænastum og tilboðum, sum í síðsta enda eru við til at tálma tørvin á búplássi á røktarheimi.

Fíggjarstýringin:
Størsti parturin av lønarútreiðslunum er á búeindunum. Deildarleiðararnir hava við vaktplanleggingini ta desentralu ábyrgdina av fíggjarstýringini. Vaktplanskipanin er sett í gongd á flestu støðum. Í løtuni fáa deildarleiðararnir tó bert stýrt í mun til útlutaðar tímar. Skipanin manglar enn fíggjarstýringsmodulið soleiðis, at deildarleiðarin í vaktplanleggingini bæði kann stýra við tímum og játtan, tí tímarnir kosta ymiskt alt eftir lønarviðurskiftunum hjá einstaka starvsfólkinum. KT-deildin hevur tikið upp samráðingar við teir partar, ið varða av vakplanskipanini, um at fáa henda hentleika settan í verk skjótast gjørligt.

Heilsu- og umsorganartænastan hevur somuleiðis tørv á fíggjarførleika sentralt. Heilsu- og umsorganartænastan umsitur stórar upphæddir og kompleksar skipanir og tænastur við støði í ymiskum umstøðum hjá nógvum einstøkum borgarum. Til tess at styrkja fíggjarstýringina í mun til fíggjarætlanina hjá heilsu- og umsorganartænastuni, eins og betri at kunna roknað kostnaðir fyri hvørja veitta tænastu v.m., verður mett neyðugt við fólki við fíggjarligum førleikum sum stuðulsfunktión hjá heilsu- og umsorganarstjóranum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at játta kr. 13,3 mió í eykajáttan til heilsu- og umsorganartænastuna fyri fíggjarárið 2016.

**Trivnaðarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at játta kr. 4,338.000,00 í eykajáttan til heilsu- og umsorganartænastuna, ið verður at fíggja sambært uppskoti, j.nr. 16/01585-4.

Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 131/16 Árligur rakstrarstuðul á mentanarøkinum – flyting til aðrar kontur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 113/16 | 16/01514-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 156/16 | 16/01514-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 131/16 | 16/01514-1 |

**Málslýsing:**
Vísandi til nýggjar leiðreglur til árligan rakstrarstuðul á mentanarøkinum hjá Tórshavnar kommunu er ikki longur gjørligt at stuðla ávísum virksemi, sum áður er stuðlað á kontum á mentanarøkinum. Talan er um árligan stuðul til Havnar Bjargingarfelag og Rescue Lív, sum seinastu árini hava fingið árligan rakstrarstuðul, tils. kr. 80.000 um árið, og til Kollafjarðar Bjargingarfelag, sum hevur fingið stuðul eftir umsókn, kr. 25.000.
Mælt verður tí til at flyta upphæddina, tils. kr. 105.000, av kontu 5366 Stuðul annars til Teknisku fyrisiting – Tilbúgving, nýggj konta.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at flyta kr. 105.000 av 5366 Stuðul annars til Teknisku fyrisiting – Tilbúgving, nýggj konta.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

## 132/16 Reglugerð Tilhaldið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 17.02.2014 | 5/14 | 14/01151-6 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 08.02.2016 | 7/16 | 14/01151-6 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 04.04.2016 | 20/16 | 14/01151-6 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 02.05.2016 | 24/16 | 14/01151-6 |
| 5 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 159/16 | 14/01151-6 |
| 6 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 132/16 | 14/01151-6 |

**Málslýsing:**
Forkvinnan ynskir sett á skrá at umrøða reglugerð v.m.

**Trivnaðarnevndin 17. februar 2014**
Nevndin ynskir at heita á Vanju Petersen, leiðara í Tilhaldinum, um at koma á næsta nevndarfund at greiða frá virkseminum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, har stovnurin Heilsu- og umsorganartænastan nú hevur Tilhaldið í Tórsgøtu um hendi, er neyðugt at broyta viðtøkurnar fyri Tilhaldið.

Uppskot til broytingar til reglugerðina verður lagt fram. Partur av hesum er broyting í leiklutinum hjá nevndini umboðandi brúkararnar í Tilhaldinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til umrøðu av uppskotinum sum grundarlag fyri hoyring til viðkomandi partar.

**Trivnaðarnevndin 08. februar 2016:** Nevndin hevði viðmerkingar til ávísar ásetingar. Samtykt at senda uppskotið til nevndina fyri Tilhaldið og eldraráðið til hoyringar.

**Ískoyti:**
Nevndin í Tilhaldinum og Eldraráðið hava latið kommununi viðmerkingar til uppskotið til broytingar í reglugerðini fyri Tilhaldið.

Við støði í viðmerkingunum verður broytt uppskot til reglugerð lagt fram á fundinum.

**Trivnaðarnevndin 4. april 2016:** Málið varð umrøtt og verður tikið upp aftur á næsta fundi.

**Trivnaðarnevndin 2. mai 2016:** Samtykt at taka undir við reglugerðini og beina málið í fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 133/16 Sáttmáli koyring av døgverðaportiónum frá Lágargarði til heimabúgvandi pensionistar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 02.05.2016 | 31/16 | 16/01062-14 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 160/16 | 16/01062-14 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 133/16 | 16/01062-14 |

**Málslýsing:**

Sáttmálið verður gjørdur millum fyritøkuna PETRA og Heilsu- og Umsorganartænastuna í Tórshavnar kommunu, sum umfatar útkoyring av døgverðaportiónum frá køkinum á Lagargarði til umleið 100 heimabúgvandi pensionistar í Tórshavnar kommunu. Sáttmálin umfatar upp til 120 brúkarar. Um talið kemur uppum, kann nýggj samráðing verða um prísin.

Talan er í stóru um framhald av sáttmála, sum táverandi sjálvsognarstovnurin Lágargarður gjørdi við nevndu fyritøku til hesa somu tænastu.

Nýggi sáttmálin er tó nakað víðkar. Økið fevnir nú um Tórshavn, Velbastað, Kirkjubø, Kaldbak og Kollafjørð. Harumframt umfatar sáttmálin dagliga koyring av heitum døgverða til Tjarnargarð.

Sáttmálin er galdandi í 2 ár frá 1. Januar 2016, og verður tá eftir ætlan boðin út sambært innkeyps- og útboðspolitikkin fyri keyp av vørum og tænastum hjá Tórshavnar kommunu.

Sáttmálaupphæddin er kr. 360.120 u/mvg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, sosialdeildarleiðarin og leiðarin á løgdeildini mæla til at samtykkja sáttmálan.

**Trivnaðarnevndin 2. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 134/16 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 240/15 | 14/05065-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 49/16 | 14/05065-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 58/16 | 14/05065-1 |
| 7 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 45/16 | 14/05065-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 23.03.2016 | 26/16 | 14/05065-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 133/16 | 14/05065-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 135/16 | 14/05065-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 18.05.2016 | 60/16 | 14/05065-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 189/16 | 14/05065-1 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 134/16 | 14/05065-1 |

## Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000
Ferðslukanning er mett til kr. 60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ferðslukanningin av Steinatúni, sum bleiv samtykt at gera á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini 28. november 2014, er nú liðug.

Ferðslukanningin tekur støði í verandi viðurskiftum, grundað á teljingar av bilum, gangandi fólki og bussleiðini í Steinatúni í meldurtíðini frá kl. 15.30 til 16.30 ein vanligan dag.

Miðað var eftir loysnum at tøma Steinatún fyri bilar i tíðarbilum við ferðsluljósum við Niels Finsens gøtu og Tórsgøtu samsvarandi vinnandi projektuppskotinum frá arkitektakappingini fyri miðbýin frá ZETA arkitektar.

Niðurstøðan í kanningini vísir, at miðal bilrøðirnar við Steinatún í meldurtíðini vilja verða nakað longri enn í dag, meðan longstu bilrøðirnar verða somu longd sum í dag.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til um peningur skal játtast til projektering av 1. byggistigi av projektinum við Steinatún.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt skipanaruppskot fyri Steinatún. Sí Hjáløgdu skitsu j.nr. 14/05065-8. Býarskipanardeildin mælir til, at játtaðar verða kr. 500.000 av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av kommununi, til projektering av Steinatúni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 500.000 kr. av konto 6275 Fríðkan av kommununi til projektering av Steinatúni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ferðslunevndin skal taka støðu til fyriliggjandi uppskot um ferðsluviðurskiftini á Steinatúni.

**Ferðslunevndin 23. mars 2016:** Málið umrøtt. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
BYARSKIPAN hevur fingið gjørt projekt klárt at bjóða út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at bjóða uppá. Ráðgevararnir hava mett um tíðarætlanina fyri verkætlanina og meta at tað ber til at gera nevndan part av Steinatúnsverkætlanini lidna til 15. juli í ár.

Sostatt er klárt at bjóða hetta arbeiðið út í undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar at innheinta tilboð, at leggja aftur fyri nevnd og býráð til støðutakan á komandi fundi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða arbeiðið út í undirhondstilboð at leggja fyri nevndina aftur á komandi fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út framíhjá og vóru tilboðini hesi uttan MVG:

- P/F Articon: kr. 4.479.578,-
- Sp/f TG Verk: kr. 3.926.120,-

Umsiting kommununnar er í samráðingum við Sp/f TG Verk um sáttmála um arbeiðið og hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting (sí j. nr. 14/05065-25) fyri arbeiðið við støði í tilboðnum frá TG-Verk, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftirlit, byggiharraveitingar, óvæntað, MVG v.m. er íroknað.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at gera sáttmála við TG-Verk um arbeiðið og at játtaðar verða kr. 5.596.000,- av íløgukarminum á 6275 Fríðkan av

kommununi, afturat teimum kr. 500.000,- sum áður eru játtaðar til prosjektering. Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at útvega fleiri parkeringspláss í Tórsgøtu beinanvegin.

**Tekniska nevnd 18. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

## 135/16 NFG17 – Atkomuhæddin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 106/16 | 16/01469-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 137/16 | 16/01469-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 99/16 | 16/01469-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 136/16 | 16/01469-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 191/16 | 16/01469-1 |
| 6 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 135/16 | 16/01469-1 |

**Málslýsing:**
Sum partur av ætlanini at gera atkomuhæddina í bygninginum hjá kommununi í Niels Finsens gøtu 17 (gamli bankabygningurin) meiri útvenda og opna, er farið undir fyrireikingarnar.

Ætlanin er at gera bygningin til eitt møtistað, ein bussterminal við ymiskum útvendum hentleikum.

Ætlanin inniber smávegis tillagingar, men ynskiligt er at varðveita bygningin í størst møguligan mun.

Tillagingarnar fevna um eitt nú atkomumøguleikar frá Steinatúni, nýggja gólválegging, ljósseting, umlegging av el og neti, tillagingar av vesum til almenningin, starvsfólkauppihald o.s.fr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samtykkja at játta kr. 1.800.000 av kt. 6110, og at kostnaðurin verður játtaður av meirinntøkunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Helena D. á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum av tí at ongin nágreinilig ætlan við bygninginum fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er boðið út og vóru tilboðini hesi uttan MVG:

- Sp/f JEP Smíð: kr. 391.042,01
- Sp/f TG Verk: kr. 1.001.680,00

Víst verður til skjal nr. 16/01469-10, tilboð JEP Smíð og skjal nr. 16/01469-11, tilboð TG Verk.

Stóri munurin á tilboðunum kemst av, at JEP Smíð ikki sá seg føran fyri at geva tilboð upp á at umvæla loftið og vildi gera tað upp á tímaløn. Harumframt hevur JEP Smíð heldur ikki givið tilboð uppá gólvarbeiðið, helst tí at ein partur longu er gjørdur.

Fyri at kunna samanbera tilboðini, eru prísirnir frá TG Verk settir inn í nøgdarlistan hjá JEP Smíð. Hetta broytir tó ikki uppá støðuna, JEP Smíð er kr. 253.340 bíligari enn TG Verk. Víst verður til skjal nr. 16/01469-9, har tilboðini verða samanborin, og skjal nr. 16/01469-8, tilmæli ráðgevans.

Samlaða kostnaðarmetingin fyri arbeiðið við støði í gjørdari prosjektering, gjørdum arbeiði, ráðgeving, byggileiðslu, fakeftirlit, byggiharraveitingum, óvæntað, MVG v.m. er áljóðandi kr. 1.834.135. Játtaðar eru 1.800.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f JEP Smíð og at heimila umsitingini at gera sáttmála upp á arbeiðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

# 136/16 Bústaðir. Umsókn um at leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2015 | 141/15 | 15/01465-2 |
| 2 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 87/15 | 15/01465-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 162/15 | 15/01465-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 124/15 | 15/01465-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 191/15 | 15/01465-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 155/15 | 15/01465-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 264/15 | 15/01465-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 24/16 | 15/01465-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 28.01.2016 | 41/16 | 15/01465-2 |
| 10 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 13/16 | 15/01465-2 |
| 11 Fíggjarnevndin | 19.04.2016 | 153/16 | 15/01465-2 |
| 12 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 102/16 | 15/01465-2 |
| 13 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 136/16 | 15/01465-2 |

**Málslýsing**:
**Umsókn um langtíðarleigumál:**
Bústaðir, Føroya Bústaðarfelag, søkir kommununa um at kunna leiga part av Kommunuskúlanum til lestraríbúðir.

Talan er um ein part av lonini, sum vendir móti Sjúrðargøtu/Tróndargøtu, umleið 1.440m² til samans, har ætlanin er at byggja lestraríbúðir.

Bústaðir ynskir at kunna leiga henda partin av bygninginum sum hann stendur, og ber Bústaðir allan kostnaðin av umbygging til íbúðirnar, bæði innan og uttanveggja, t.v.s. at Bústaðir ber allar útreiðslur til verkætlanina.

Bústaðir ynskir leigumál yvir 30 ár, har bústaðir átekur sær at umbyggja og viðlíkahalda lonina í sama tíðarskeiði.

Talan er um eina stóra verkætlan og metir Bústaðir tað vera rættast at lyfta umbyggingina í stigum. Bústaðir er til reiðar at luttaka í tí heildarætlan sum umfatar aðrar partar av skúlanum bæði tí ynskiligt er at fleiri leigubústaðir skulu gerast og tí, at umbyggingar og umvælingar fyri allan skúlan væntandi skulu gerast í einum, t.d. at skifta tak og at skipa uttanum økini.

Bústaðir vísir til fund við stjórn, har avtalað varð at seta ein arbeiðsbólk ið skal lýsa verkætlanina nærri, og skal arbeiðsbólkurin gera eitt tilmæli til stýrið hjá Bústøðum og til politisku skipanina.

<u>Taks setir treytir um talan skal gerast um mvg-frítøku.</u>
Síðani Bústaðir sendi kommununi umsóknina um leigumálið, hevur TAKS víst á, at um Bústaðir skal hava mvg. frítøku fyri umvæling av kommunuskúlanum, er neyðugt

at Bústaðir eigur bygningin, tí TAKS krevur tinglýst veð í bygninginum fyri mvg. frítøkuna.

Bústaðir kannar um til ber at sleppa undan hesi reglu, men um undantak ikki fæst, søkir Bústaðir at keypa partin av Kommunuskúlanum fyri 1. kr. og fær kommunan tá forkeypsrætt, til ein frammanundan mettan prís.

Í løtuni ber tí ikki til at siga, um talan kann gerast um langtíðarleigumál ella um møguliga sølu við kommunalum forkeypsrætti.

<u>Langtíðarleiga/Søla uttan alment útboð.</u>
Sambært svarskrivi sum kommunan fekk frá Innlendismálaráðnum 11. apríl 2013, í samband við at kommunan søkti um loyvi til sølu av lendi til Bústaðir framgongur, at Bústaðir skal javnsetast við almennan mynduleika, og at til ber at selja ognir til Bústaðir uttan at ognirnar verða boðnar alment út.

<u>Onnur formlig viðurskifti:</u>
Møguligt søla/leiga av parti av kommunuskúlanum krevur at hesin parturin verður frámatrikuleraður, og kann tí gerast talan um at kommunan selir umsókta partin av skúlanum, og langtíðar leigar undirlendið.

Sambært samrøðu við Umhvørvisstovuna framgongur, at til ber at frámatrikulerað part av skúlanum til nýtt matrikul nr. treytað av brunagóðkenning. ( Krøv um brandmúr v.m )

**Tilmæli:**
Málið verður lagt fyri fíggjarnevnd til umrøðu og møguliga støðutakan.

**Fíggjarnevnd 21. maj 2015:** Málið umrøtt.

**Býráðið fyri læstum hurðum 21. mai 2015:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Endalig avkláring uppá mvg. spurningin fyriliggur ikki enn, men væntar Bústaðir at ein loysn finst fyri hesum og arbeiðir Bústaðir við upprunaligu loysnini sum umfatar leigu.

Eitt langtíðarleigumál viðførir, at neyðugt verður at frámatrikulera partin, sum Bústaðir leigar til nýtt matrikul nr.

Um kommunan leigar partar av skúlanum út til Bústaðir, verður neyðugt at tryggja, at Bústaðir rindar allar útreiðslur, sum leigumálið hevur við sær, herundir eisini tær útreiðslur, sum standast av teimum møguligu broytingum av bygninginum, sum verða kravdar í sambandi við frámatrikuleringina. Her verður hugsað um brunamúrar v.m.

Eitt møguligt leigumál skal verða uttan útreiðslur fyri kommununa.

Løgdeildin hevur gjørt eitt uppskot til leigumál, sí skjal nr. 15/01465 – 5

Talan er um 30 ára leigumál við møguleika fyri framlongjan í 10 ár. Tá ið leigumálið gongur út, hevur kommunan rætt til at yvirtaka innrættaðu hølini fyri 75 % av mettum virði. Leigugjaldið er ásett til kr. 1.000 árliga.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at leiga Bústaðir uml. 1.440m² av kommunuskúlanum sambært uppskot leigusáttmála, sí skjal nr. 15/01465 – 5.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein taka undir við at leiga Bústaðir uml. 1.440 m² i einum 30 ára leigusáttmála, sum verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at taka Kommunuskúlan niður og at tingast við Bústaðir um at byggja nýggjar lestraríbúðir á staðnum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Elin Lindenskov

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti.**
Greitt verður frá málinum. Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Kunnað varð um málið, sum verður beint í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Frágreiðing og møguligt tilmæli kemur til fundin.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13083<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Málið umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:** Tórshavnar kommuna og Bústaðir eru komin ásamt um treytirnar í einari rammuavtalu fyri verkætlanina at gera Kommunuskúlan til lestrarbústaðir, ið verður løgd fyri fíggjarnevndina og býráðið at góðkenna.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi uppskot til rammuavtalu, j.nr. 15/01465-16 og 15/01465-17.

**Fíggjarnevndin 28. januar 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum og játta kr. 400.000 kr av konto 1313 visandi til § 8 í rammuavtaluni og mæla býráðnum til at góðkenna rammuavtaluna.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurdsson, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu
Jógvan Arge og Marin Katrina Frýdal

Greiddi ikki atkvøðu:
Jákup Dam

**Ískoyti:**
Kunning um verkætlanina
Vísandi til áður samtykta rammuavtalu millum Tórshavnar kommunu og Bústaðir, varð verkætlanin at høvuðsumvæla verandi Tórshavnar Kommunuskúla til lestraríbúðir v.m. bjóðað út millum tveir høvuðsarbeiðstakarar. Tilboð komu inn 16. mars 2016. Tilboðini uppá handverkaraútreiðslur uttan mvg vórðu:

| | |
|---|---|
| Eysturlon Sp/f | 54.849.240,00 kr. |
| Húsavarðatænastan Sp/f | 45.735.753,00 kr. |

Ikki bara prísurin hevði týdning, men dømast skuldi eftir fleiri kriterium. Ein verkætlanarbólkur av fólki frá TK, Bústaðir og ráðgevum gjørdi eina innanhýsis meting/døming av innkomna tilfarinum, har komið varð fram til, at Húsavarðatænastan (HVT) hevði eitt betri samlað tilboð. Hesi boðini vórðu givin arbeiðstakarum 22.03.2016. Eftir samtykki frá stýrisbólkinum fyri verkætlanina, varð farið undir samráðingar við HVT.

Samráðingarnar eru komnar á mál, og samlaði verkætlanarkostnaðurin sær nú soleiðis út :

| | | |
|---|---|---|
| Fyrireiking | Kr. | 634.854,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Arbeiðstakaraútreiðslur | Kr. | 43.516.475,40 |
| Keyp av konstruktiónsverkfr., ókendar útreiðslur og incitament | Kr. | 4.399.336,50 |
| Ráðgeving El | Kr. | 100.000,00 |
| Byggiharraútreiðslur, trygging, íbinding vm. | Kr. | 1.200.000,00 |
| Projektering, projektuppf. og fakeftirlit | Kr. | 2.982.000,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| Útreiðslur í smb. við arbeiðstakaratillutan | Kr. | 100.000,00 |
| | | |
| Í alt uttan MVG | Kr. | 52.979.290,90 |

Viðlagt er sáttmáli til partalag, organisatiónsdiagram, ráðgevaraavtala og arbeiðstakarasáttmáli saman við tíðarætlan.

Parturin av handverkaraútreiðslum hjá Tórshavnar kommunu verður at rinda klimaskermin, tó uttan altanir. Restin rindar Bústaðir.

Parturin hjá Tórshavnar Kommunu við øllum er:

| | | |
|---|---|---|
| Handverkaraútreiðslur og byggiplássútreiðslur | Kr. | 12.841.212,00 |
| Ókent og Incitament (33%) | Kr. | 1.354.761,00 |
| Ráðgeving (33%) | Kr. | 984.060,00 |
| Verkætlanarleiðsla | Kr. | 340.625,00 |
| | | |
| Tilsamans | Kr. | 15.520.658,00 |
| Mvg kostnaður tils., verkætlanarleiðsla ikki íroknað | Kr. | 608.127,00 |
| TK, tilsamans við Mvg | Kr. | 16.128.785,00 |

Útyvir hetta, verður í løtuni serskilt arbeitt við at gera drening av kjallaraveggum og sokkli um bygningin og íbinding til kloakk, umframt nýggja parkeringsloysn oman við Tróndargøtu. Umsitingin vendur aftur, tá hesin kostnaður er kendur. Arbeiðið hevur alla tíð verið uttanfyri verandi verkætlan. Hetta arbeiðið skal samskipast við gerð av garðprosjekt seinni.

Sambært rammuavtalu skal TK skeyta Bústaði ognina matr. 339 Tórshavn, burtursæð frá vonginum móti Tróndargøtu, sum er fimleikahøll og rúm tilknýtt fimleikahøll.
Viðlagt er uppskot til skeyti.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.
Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin niðurlagdur.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin og kommunustjórin mæla til at játta kr. 16.129.000,00 til verkætlanina at høvuðsumvæla Tórshavnar kommunuskúla og at taka undir við uppskotinum til skeyti.

Partur av fígging er framflytingar av roknskaparári 2015 kr. 12.155.000,00.

Í restandi 3.974.000 mió. kr. verður fíggja soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 8175 | Framfluttur løgukarmur, Glyvursvegur við Brúgv | 415.000 |
| 5775 | Framfluttur løgukarmur, Golfvøllur | 400.000 |
| 5775 | L54016, Golfvøllur | 680.000 |
| 7175 | Framfluttur løgukarmur, Tyrvingarpláss | 2.479.000 |

Hædd verður tikið fyri játtanini til tyrvingarpláss í fíggjarætlanini fyri 2017.

**Fíggjarnevndin 19. april 2016:** Fundurin uppafturtikin.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Viðm. frá Tjóðveldi: Vegna mátan at fíggja kommunala partin av meirinntøkunum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13086 |
| | Formansins merki: |

# 137/16 Søla bygningur matr. nr. 320a. ( Hugskotið )

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 29/16 | 15/05000-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 177/16 | 15/05000-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 137/16 | 15/05000-1 |

**Málslýsing:**

Bygningurin hevur staðið á sølulista hjá Skyn í nakrar mánaðar. Prísuppskot 3,9 mill. kr.

Í sølulýsingini verður tilskilað, at krav er um útvent virksemi í niðastu hædd.

Sambært Skyn framgongur, at nakrir fyrispurningar hava verið uppá ognina og hava verið 4 framsýningar.

Viðkomandi áhugaðu keyparar hava ymiskar ætlanir við húsunum, sum spenna frá at keypa ognina at leiga út til vinnuligt virksemi. At keypa til bústað og leiga veghædd út til útvent virksemi. Onkur hevur eisini nevnt møguleikan at býta bygningin upp í íbúðir til útleigan.

Enn er onki boð komið uppá ognina.

**Tilmæli:**

Bygningurin hevur ikki staðið so leingi til sølu, og mæla kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini til at hava ognina á sølulista eina tíð enn.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti.**

Tað eru ymiskt sum talar fyri, at prísuppskotið 3,9 mill. kr. er sett ov høgt í mun til marknaðarvirðið.

Skyn ásetti prísuppskotið út frá eini meting av hvat ognin kann geva í leiguinntøkum, út frá tí fortreyt, at øll ognin verður leigað út sum vinnuligt leigumál, við einari samlaðari leiguinntøku á uml. 372..000 kr. pr. ár. . ( 1.771 kr/m2. pr ár ) Hetta kann samanberast við kommununar leigu fyri handilshølir í miðbýnum sum er 1.000 kr.m2. pr. ár.

Løgdeildin hevur í samráð við Skyn fyri umleið einum mðr. síðani lækkað prísuppskotið til 3 mill. kr. men tilskilar kommunan sær framvegis rætt til ikki at taka av boðum.

Eitt boð er innkomið á 3. mill. kr. sum er galdandi til 03.05.2016 kl. 12:00

Bjóðarin hevur boðað frá, at hansara boð ikki stendur við longur enn til omanfyri nevndu freist.

Men hann er møguliga sinnaður til at leggja boð innaftur áljóðandi 3 mill. kr. um hann fær at vita, at kommunan er sinnað at selja fyri 3. mill. kr.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at geva heimild til at selja ognina fyri í minsta lagi 3. mill. kr.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 138/16 Bankabygningur Niels Finsensgøta. Útleigan av atkomuhædd og part av kjallarahædd.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 121/16 | 16/01556-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 179/16 | 16/01556-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 138/16 | 16/01556-1 |

**Málslýsing:**

Uppskot er gjørt til innrættan av atkomuhæddini í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu.

Ætlanin umfatar eitt torg + 3 leigumál.

Kommunan hevur verið í samráðingum við Visit Tórshavn og Tjaldursapotekið um leigumál.

Ætlanin umfatar at:

- Tjaldurs apotek leigar 62,6m2 í atkomuhædd til útsølu, 51,7m2 í kjallara til goymslu + 1/3 av felagsøki í kjallara.
- Visit Tórshavn leigar 133m2 av atkomuhædd, 39 m2 í kjallarahædd til goymslu + 1/3 av av felagsøki í kjallara.
- Lýsa eitt leigumál til leigu á 60m2 í atkomuhædd, 15,5 m2 í kjallara + 1/3 av felagsøki í kjallara.

Kommunan ynskir at hava eitt ávíst fjølbroytni í virkskeminum í býnum, og verður mett, at kommunan kann leiga út til Apotek og Kunningarstovu, uttan at leigumálið verður bjóða út.

Talan er um alment virksemi sum ikki liggur í beinleiðis kapping við privatu vinnuna. Virksemið hevur kommunalan áhuga, og tekur býarskipanarlig atlit.

Leigumálið, ið verður boðið út, verður við treytum fyri hvat virksemi skal vera, og er ætlanin at seta sum treyt, at talan er um Café.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at leiga atkomuhæddina og partar av kjallarahæddini í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu út til Visit Tórshavn og Tjaldursapotek.
Endaligar treytir við meira verða avgreiddar í samráð við útleigara, og verða leigumálini síðani fyriløgd fíggjarnevnd.

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at lýsa eitt leigumál leyst til útleigan, við treytum um at talan skal verða um café.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Málslýsing:**

Leigumálið hevur verið lýst leyst við umsóknarfreist til 02.05.2015.

Innan freist komu inn hesar umsóknir.

**Gómagátt.** ( Kirstin og Høgni Hammer )
Umsøkjarin heldur í dag til í leigaðum hølum, har framleiddar verða dygdar sjokolátavørður.

Felagið leggur stóran dent á góðskuna. Alt verður gjørt við hond úr bestu rávørum, og í størst møguligan mun úr føroyskum rávørum. Tey leggja dent á ikki at koyra haldevni í vørurnar. Hetta gevur vørunum ein reinari og betri smakk.

Felagið ætlar at flyta sjokolátaframleiðsluna oman í býin, og harumframt at reka útsølu og café á staðnum. Ætlanin er at framleiða og selja nýgjørda konfekt, køkur dessertir og bollar, sum kunnu serverast á staðnum við kaffi og líknandi. Talan verður bara um vørur sum verða framleiddar á staðnum. Hølini verða sostatt innrættaði til framleiðslu, útsølu og café.

**Brell Café.** ( Róaldur Jákupsson )
Umsøkjarin hevur ætlanir um at selja okkurt fastfood líknandi sum kann servera take-away kaffi skjótt og í rímuliga stórum mongdum. Umsøkjarin metir, at nógv fólk fara at ferðast ígjøgnum bygningin alla tíðina, og at ein stemningur av farti og skundi verður. Umsøkjarin hevur ætlanir um at lata upp eitt super trendy stað við modernaðari útsjónd, har hann fer at brúka umhvørvisvinarlig take-away íløt og eisini nýbrent fairtrade kaffi.
Ætlanin er at seta upp eina stóra espressomaskinu við 3-4 statiónum, sum kann levera nógvar drykkir í senn uppá stutta tíð. Umsøkjarin ímyndar sær eitt stað, har mann kann standa, sita ganga hvør um annað við sínum kaffi. Ætlanin er eisini at selja sunnar og skjótar skundverðir frá lokalum veitarum. Hann vísir til at talan er ikki um eitt vanligt fastfood stað við ljótum plastikk pang farvum og vánaligum kaffi. Hann vil vísa at man saktans kann bjóða nógv nýbrent dygdarkaffi, skjótt og effektivt, og samstundis hava ein góðan modernaðan og burðardyggan stíl.
Umsøkjarin tekur saman um og greiðir frá, at hann vil gera eina burðardygga fastfood café, har hann brúkar føroyskar veitarar. Allar vørur skulu ver aporførar og helst lokalar, og íløt skulu vera umhvørvisvinarlig.
Hann vísir til at hann nýligani er byrjaður at reka café í miðbýnum. At caféin hevur fingið góða móttøku, men er stóri vansin, at hann ikki kann kenna seg tryggan í leigumálinum, vísandi til at leigumálið hevur 3 mðr. uppsøgn, og at ætlanir eru at um byggja hotel á økinum.

Birgit Andersen og Guðrið í Bartalsstovu.
**( Reka Tórscafé í Bókasavninum )**
Tær vísa til at tær í 7 ár hava selt pannukøkur ( crepes ) á gongugøtuni um summari, á jólum og á skoytubreytini.
Síðan november 2015, hava tær rikið Tórs Café á gongugøtuni.
Tær vísa til at tær seta kundan í miðdepulin og selja dygdargóðar vørur. Tær virða kundan, og ynskja at skapa eitt gott og fjálgt umhvørvi, har fólk trívast.

Ætlanin er at lata upp eina lagkøkukafé – køkutorg. ( samanber við Lagkagehuset í Danmark ) Ætlanin er at selja smákøkur, formakøkur, eplakøku v.m. Ætlanin er somuleiðis at hava drýl við føroyskum viðskera, umframt eitt stórt úrval av kaffi og te.
Eisini er ætanin at selja frukt- heilt og skori grønmeti. Vísandi til at ongin kiosk er í miðbýnum, umhugsa tær at hava eina kiosk við minni úrvali av kioskvørum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at leiga hølini út til Gómagátt.

Talan verður um 10 ára leigumál til vanligar treytir, og við møguleika til at leingja um leigumálið. Eigarin kann ikki siga leigumálið upp fyrstu 10 árini, meðan leigarin kann uppsiga leigumálið við eitt árs freist.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið av skrá.

# 139/16 Høli í Tórsgøtu 16, eru lýst til útleigan. Freist at søkja 06.05.2016.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 180/16 | 16/01557-4 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 139/16 | 16/01557-4 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur lýst hølini Tórsgøta 16, leys til útleigan.

Leigumálið umfatar allan bygningin Tórsgøta 16.
Loft. Uml. 75 m2.
Miðhædd. Uml. 96,5 m2
Veghædd. uml. 100,5 m2.

Leigan er ásett til 1.000 kr. m2. pr. ár.
Leigan verður regulerað samsvarandi almenna prístalinum triðja kvartal 2011.
Prístalsregulerað er leigan 1.000 x 118,4/117 = 988,18 kr.m2. pr. ár.
Fyri trappu-uppgongd verður goldið 494,09 kr.m2.pr. ár.
Prísurin er íroknaður olju men uttan el.
Samlað útroknað mánaðarlig leiga 20.926,22

Til ásettu freist komu inn 6 umsóknir.

**Guðrun og Guðrun.** Tær søkja um miðhædd + loft.
Á loftinum verða skrivstovur.
Í miðhæddini goymsla, verkstaður framsýning og móttøka fyri vitjandi.

Tær hava goymslu og verkstað í Handilshjarnanum, men er tað leigumálið uppsagt og er alneyðugt at finna onnur høli.

Umsøkjarin vísir til, at hølini í Tórsgøtu liggja sera væl fyri beint við handilin.

Tær greiða frá, at tær í fleiri ár hava havt ætlanir um at byggja út handilin, og er ætlanin at byggja út móti torginum við eini hálvari glasbløðru, soleiðis at inngongd er í handilin frá báðum síðum. Hetta fyri at gagnnýta og hugna um steinsetta torgið.

Í bygninginum í Tórsgøtu er ætlanin, at innrætta part av miðhæddini soleiðis, at tær kunnu taka ímóti tíðindafólki og almennum vitjandi.

Talan verður um ein livandi verkstað, sum bæði verður arbeiðsrúm hjá Guðruni Ludvig, og samstundis eitt stað, har tær kunnu hitta tey mongu vitjandi frá nær og fjar.

**Soulmade.** Søkja um hølini í veghædd út til Tórsgøtu.

Føroyska klædnamerkið Soul Made Faroe Islands er áhugað í at leiga niðastu hædd, har góðir møguleikar eru fyri at reka eitt spennandi, innbjóðandi og útvent handilsvirksemi. Eisini tykjast nógvir møguleikar at vera fyri at skipa fyri tiltøkum bæði inni í hølunum eins og á

torginum uttanfyri. Umsøkjarin metir,  at handilin verður við til at skapa lív í miðbýnum sum heild.

Felagið skipar fyri tiltøkum. Nevnast kunnu. Tvær ferðir árliga, Shopping after Dark. Tónleikatiltøk. Eru partur av Vetrarljós í februar við tónleikaframførðslu í handlinum.

Felagið ynskir at brúka torgið uttanfyri. At skipa fyri mótasýningum, har fleiri klædnahandlar í miðbýnum luttaka. Felagið kann skipa fyri smærri tónleikatiltøkum í samband við langar leygardagar. Møguleiki er eisini fyri at bjóða café-virksemi at hava pop-up-store á torginum í summarmánaðunum. Tey hugsa eisini um møguleikan at skipa fyri móta-tiltiltøkum partvíst úti á Tórsgøtu, og partvís undir komandi glastekjuni á Perlutorginum.

Felagið ynskir at kunna leiga part av miðhæddini til skrivstovu, soleiðis at marknaðarføringin kann styrkjast serliga til útlendska marknaðin. Umsøkjarin vísir á, at tey møguliga høvdu havt áhugað í at leiga allan bygningin, treytað at tey kunnu framleiða til aðrar smærri fyritøkur.

Við Soul Made í Tórsgøtu, fær miðbýurin ein spennandi handil við føroyskt sniðgivnum mótaklæðum. Øll klæðini hjá Soul Made verða sniðgivin í Føroyum, og alt tað hondbundað verður bundið av føroyskum bindikonum.

**Veita.fo og byggitrygd.fo** Felagsumsókn um miðhædd og loft.
Veita.fo og byggitrygd.fo eru tvær fyritøkur sum eru sprotnar úr Hugskotinum hjá Tórshavnar kommunu, har fyritøkurnar enn húsast.

Talan er um útvendar fyritøkur sum vísa til, at tað er umráðandi, at kundin sleppur á gátt. Báðar fyritøkurnar eru í tænastuvinnuni.

Fyritøkurnar skulu brúka hølini til egi brúk, og er ætlanin eisni at innrætta part av húsinum til eitt modernað “ pop up place “ har ætlanin er at geva íverksetarum møguleikan, at leiga hølir í stutt tíðarskeið fyri at royna  egi konsept.

Veita.fo kom á alnótina í mai 2015. Endamálið hjá felagnum er at virka sum bindilið millum veitarar og útbjóðarar. Í dag eru yvir 500 uppgávur stovnaðar, eins og meir enn 200 veitarar og 350 útbjóðarar, eisini eru skrásettir á Veita.fo

Byggitrygd Sp/f arbeiðir við orkurættari ráðgeving innan bygging. Kundar eru alemnnir og kommunalir byggiharrar og privatfólk.
Felagið hevur brúk fyri at skrivstovan er sjónlig og liggur væl fyri.

**Gómagátt.**
Felagið hevur fyrst og fremst søkt um leigumálið í Niels Finsensgøtu, men um felagið ikki fær leigumál har, søkir felagið í øðrum lagi um leigumál í hølunum í Tórsgøtu.

**Café.** Veghædd.
Umsøkjarin hevur ætlanir um at reka café við øllum tí í tilhoyrir, smáréttum og heilsugóðum skundverðum.
Morgunmatur, bakeoff morgunbreyð, wienarbreyg ogkaffi/te.
Frokost/nátturði. Skundverður av sandwich ella bagel og salatbarr.
Allan dagin verður møguligt at fáa kaffi, te og heimabakaðar køkur, smáréttir, sodavatn og frísktpressað juice.
Opið verður mánadag til fríggjadag kl. 09.00 – 20.00 og leygardag kl. 09.00 – 17.00

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13093 |
| | Formansins merki: |

**Indisk matstova.** Søkir um allan bygningin í Tórsgøtu.
Í ovastu hæddini er ætlanin at hava barnavinarligt umhvørvið við softplay umráði. Her skulu børn kunna røra seg og nýta sítt hugflog, meðan tey vaksnu kunnu njóta eina góða máltíð.

Talan verður um matstovu við autentiskum indiskum mati av høgari góðsku. Skipað verður fyri buffet bæði á middegi – millum kl. 11 – 15 og aftur frá kl. 17 – 22.30
Á kvøldið verða bæði buffet og a la carte rættir. Staðið er hugsað bæði til vanligar og fínari máltíðir.

Opið verður allar dagar í vikuni millum kl. 11 – 22.30

Hølini verða innrættað í retrostýli – og er ætlanin um summarið at brúka torgið.

Tey ynskja at leiga allar tríggjar hæddirnar, soleiðis at til ber at taka ímóti størri selskapum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at leiga allan bygningin út til umsøkjararnar, sum hava ætlanir um at opna eina indiska matstovu í bygninginum.

Talan verður um leigumál til vanligar treytir. 10 ára óuppsigiligur leigusáttmáli frá eigarans síðu, meðan leiðarin kann uppsiga leigumálið við eitt ára freist.
Tá ið 10 árini eru liðin, kunnu báðir partar uppsiga leigumálið við eitt ára freist.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Jógvan Arge, mæla býráðnum til at gera leigusáttmála við Soul Made um niðastu hædd og við Guðrun & Guðrun um tvær tær ovastu hæddirnar.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Greiddi ikki atkvøðu: Helena Dam á Neystabø.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13094 |
| | | Formansins merki: |

# 140/16 Tjaldurs Apotek. Leigumál í bankabygninginum í Niels Finsensgøtu.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 178/16 | 16/01842-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 140/16 | 16/01842-1 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur havt samráðingar við Tjaldurs Apotek um leigumál í bankabygninginum.

Tjaldurs Apotek hevur áhuga í at lata upp útsølu við apoteksvørðum í miðbýnum. Í fyrsta umfari verður ikki talan um receptvøru, men kann hetta koma uppá tal seinni.

Leigumálið í Niels Finsensgøtu umfatar 62,6m3. Í veghædd 51.7m2 goymslurúm í kjallara og 1/3 av felagskøki sum er 23m2.

Leigan er 1.000 kr.m2. pr.ár fyri høli í veghædd og 500 kr.m2.pr.ár fyri goymsluhøli og felagshøli í kjallara.

Annars verður talan um 10 ára leigumál við møguleika fyri framlonging. Leigarin kann siga leigumálið upp við eitt árs freist.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at gera 10 ára leigusáttmála við møguleika fyri framlonging og til vanligar treytir.

Leigusáttmálin verður óuppsigiligur í 10 ár frá eigarans síðu, meðan leigarin kann uppsiga leigusáttmálan við eitt árs freist.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**

Tjaldurs Apotek vísir til, at tað var kommunan sum ynskti at Apotekið byrjaði eina útsølu í miðbýnum. Síðani hevur verið samráðst út frá teirri fortreyt, at kommunan hevur ein áhuga í, at Apotekið letur upp eina útsølu í miðbýnum. Mett varð, at hetta kundi geva eitt ískoyti til virksemið og trivnaðin í býnum. Talan skuldi vera um eina royndartíð í eitt ár, har leigan er uttan gjald, og ein eftirmeting skuldi síðani gerast um eitt ár.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið av skrá.

## 141/16 Visit Tórshavn. Leigumál í bankabygninginum. Niels Finsensgøta.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 176/16 | 16/01841-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 141/16 | 16/01841-1 |

**Málslýsing:**

Kommunan hevur havt samráðingar við Visit Tórshavn um leigumál í bankabygninginum.

Sum er heldur Visit Tórshavn til í hølum hjá P/F H.N. Jacobsens Bókahandli, og hevur hesin leigusáttmálin 6 mánaða uppsagnartíð.

Tískil er neyðugt at rinda leigu fram til og við 01.12.2016 um ikki onnur avtalað fæst um hetta leigumálið.

So skjótt sum hølini eru klár í bankabygninginum flytir Visit Tórshavn niðjan, og er neyðugt at finna eina loysn uppá leiguna fyrstu tíðina, vísandi til verandi leigumál í verandi hølum hjá P/F H.N. Jacobsens Bókahandli.

Leigumálið í Niels Finsensgøtu umfatar 133m2 í veghædd, 39m2 goymslurúm í kjallara hædd og 1/3 av felags køki sum er 23m2.

Leigan er 1.000 kr.m2.pr.ár fyri høli í veghædd og 500 kr.m2.pr.ár fyri goymsluhøli og felagshøli í kjallara.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at gera ein 10 ára leigusáttmála við møguleika fyri framlonging og til vanligar treytir.

Leigusáttmálin verður óuppsigiligur í 10 ár frá eigarans síðu, meðan leigarin kann uppsiga leigusáttmálan við eitt árs freist.

Verandi leigusáttmálið við P/F H.N. Jacobsens Bókahandil verður uppsagdur við stytst møguligari freist, og verður leiga ikki kravd fyri leigumálið í Niels Finsensgøtu, fyrr enn sáttmálin í Bókahandlinum er farin úr gildi.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Tikið av skrá.

# 142/16 Leigusáttmáli. Pæsastova. Matr. nr. 66, Tórshavn. Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 181/16 | 16/01698-2 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 142/16 | 16/01698-2 |

**Málslýsing:**

Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli sum hevur leigusáttmála uppá Pæsastovu fram til 30.06.2016, ynskir leigumálið at vera galdandi til 30. juni 2021.

Sí uppskot til sáttmála 16/01698-1

Leiðarin í Kvøldskúlanum vísir á, at kvøldskúlin hevur brúk fyri húsunum, og at neyðugt er at hava eina leiguavtalu, tí nógv fólk halda seg hava brúksrætt til húsið, og er neyðugt at kunna vísa á, at Kvøldskúlin hevur leigusáttmála.

Kvøldskúlin hevur havt nógv virksemi í húsunum .

Guðrun Sólja hevur havt 35 næmingar í Pæsastovu í sangi og sangteknikki fyri bæði børn og vaksin og fyri kóri.

Onnur tiltøk sum hava verið í Pæsastovu eru: skeið í persónligari menning, skeið í føroyskum fyri útlendingar, tiltakið við Jørleifi í Býin, tiltakið við Mariusi í Býin.

Harumframt hevur verið skipað fyri smærri konsertum og tiltøkum til mentunarnáttina.

Húsaumsitingin hjá kommununi hevur alt viðlíkahald uttan, meðan Kvøldskúlin hevur vanligt viðlíkahald innan + rindar fyri el og hita.

**Tilmæli:**
Leiðarin í mentamáladeildini, kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at framlongja leigumálið til 30. juni 2021.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13097 |
| | | Formansins merki: |

## 143/16 Støðutakan til, um Tórshavnar havn skal brúka grundøkið undir neystinum hjá Havnar Róðrarfelag, ella leingja leigusáttmálan.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 02.05.2016 | 21/16 | 16/01438-5 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 143/16 | 16/01438-5 |

**Málslýsing:**
Umsókn frá Havnar Róðrarfelag, um at endurnýggja leigusáttmálan um grundøkið undir róðrarneystinum í Álakeri.

Havnar Róðrarfelag leigar eitt 2.200 $m^2$ stórt øki í Álakeri, sum eisini verður brúkt sum grundøki fyri felgashúsinum.

**Viðmerkingar:**
Leigusáttmálin er upp á 25 ár, og gekk út tann 8. mars 2016. Grein 4 í leigusáttmálanum sigur tó, at
***"um so verður at Tórshavnar havn, tá ið leigumálið er at enda, sbr. grein 2, 1. pt., ikki ynskir at taka við økinum til egið brúks, sbr. grein 6 í hesum sáttmála, skal leigarin hava rætt til at leingja leigumálið fyri 10 ár aftrat móti at gjalda plássleigu".***

Tórshavnar havn hevur ikki ætlanir á økinum.

Í sambandi við útbyggingina av Landssjúkrahúsinum, kann tað blíva eitt ynski frá byggiharranum, at fáa ein part av tí leigaða økinum hjá Havnar Róðrarfelag í sambandi við projektið.
Í grein 7 í verðandi leigusáttmála stendur:
***"Um tað skuldi víst seg neyðugt við einari seinri regulering og matrikulering at broyta markini á tí leigaða økinum, skal einki verða til hindurs fyri hesum, um hetta verður gjørt uttan at skerja nýtsluna av økinum til bátaneyst."***
***"Vegna tað, at tað leigaða økið byrgir fyri atgongdini til økið sunnanfyri, skal Tórshavnar havn ella framtíðar leigari av hesum øki hava rætt til at gera o.u. 8 m breiðan veg gjøgnum økið, Havnar Róðrarfelag leigar".***

Vanligt er ikki at langtíðarleiga økir til annað enn sjálvt grundøkið undir bygninginum.
Um Havnar Róðrarfelag í framtíðini bara leigar økið, sum er undir bygninginum, eiga teir at hava rætt og møguleika at flota bát.

**Tilmæli frá havnarmeistarnum:** Av tí at Tórshavnar havn ikki hevur nakrar ætlanir um at brúka grundøkið til egið brúk, verður tikið til eftirtektar, at leigarin hevur loyvi at leingja leigumálið við 10 árum.
Vísandi til grein 7 í verðandi leigusáttmála, verður mælt til at minka tað leigaða økið, til bara at umfata grundøkið undir sjálvum bygninginum, og at teir samstundis fáa rætt og møguleika at flota bát.

**Vinnunevndin 02. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13098 |
| | | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

## 144/16 Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 54/14 | 14/00772-13 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 2/15 | 14/00772-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 14/15 | 14/00772-13 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 37/15 | 14/00772-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.03.2015 | 32/15 | 14/00772-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 243/15 | 14/00772-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 312/15 | 14/00772-13 |
| 8 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 245/15 | 14/00772-13 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 74/16 | 14/00772-13 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 11 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 75/16 | 14/00772-13 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 126/16 | 14/00772-13 |
| 14 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 175/16 | 14/00772-13 |
| 15 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 144/16 | 14/00772-13 |

**Lýsing av málinum:**

Í sambandi við fyrispurningar um nýggjan kirkjugarð í Hóyvík, hevur umsitingin gjørt uppskot til staðseting fyrr ávíst 5 ymiskar staðsetingarmøguleikar (j. nr. 2007-2037/4). Arbeitt hevur verið víðari við at kannað um eisini aðrir staðsetingarmøguleikar eru, og verður hervið víst á eitt økið afturat. Økið sum talan er um, liggur oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

**Byggisamtyktin:**

Verandi serstaka byggisamtykt fyri hetta økið varð gjørd í sambandi við býarpartin Stórutjørn. Stórur partur av økinum er D2 og har, sum hetta endar eystureftir, stingur ein kíli av 4. grundumráði, hagi, seg inn millum D2 og A3 bústaðarøkið Inni á Gøtu.

**Økiseyðkenni:**

Norður-suðurgangandi dalskap við norðurendan av Dalinum Langa. Dalurin ella lægdin liggur nakað burtur frá Sambindingarvegnum (Klingran) og eru góðir møguleikar at staðseta bygningar og parkeringsøki skamt frá vegnum. Í lívd av eysturhallandi skráa liggur vesturhallandi slætti við stórbærum útsýni norðureftir móti Sundalagnum og tí vakra Skálafirði.

**Nærøkini:**

Økið liggur vart og er ikki áloypandi í lendinum, millum 5 og 20 metur hægri enn bústaðarøkið Inni á Gøtu, og partvís afturundir lítla heygnum millum bæði økini.

**Víðkanarmøguleikar:**

Samlað økisvídd er 25.000 m², og góður møguleiki er at byrja við 3.500 - 5000 m² í lægdini undir brekkuni, fyri síðan at víðka norðureftir.

**Atkomuviðurskifti:**

Tætt við sambindingarveg, ið kann leiða nógva bilferðslu. Siðvenjan at ganga í gravarfylgi er komin til eitt vegamót, men eru her møguleikar, tí í beinari linju eru 950 m til kirkju og

samkomuhús ígjøgnum fríøkið Dalurin Langi. Til sammetingar er beina leiðin millum Dómkirkjuna og kirkjugarðin við Velbastaðvegin 1250 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fígging er avsett til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík. Útvegan av kirkjugarði í Hoyvík er ikki átrokandi, við tað at verandi kirkjugarður í Tórshavn hava nøktandi pláss enn.

**Niðurstøða.**
1. Kirkjugarður á hesum stað vil ikki ávirka verandi býarbygging.
2. Tað er av týdningi at kirkjugarðurin kann víðkast.
3. Kirkjugarðurin kann vera partur av frílendisætlan fyri býarbygging í Hoyvíkshaganum.
4. Siðvenja er at leggja kirkjugarðar uttanfyri býir og bygd øki, fyri síðan at býurin nærkast og at enda fevnir um økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til staðsetingarmøguleikar út frá fyriliggjandi uppskotum, og um arbeiðast skal víðari við málinum, og um so er, at játtað pening til fyrireikingar, herundir kanningar og projektering av skitsuuppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Formaðurin hevur ynskt málið á skrá til ummælis

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Um arbeiðast skal víðari við málinum, kann víðari gongdin í málinum verða:
1. Keyp av lendi
   Keyp av lendi 25.000 m$^2$ av matr. 135ed Hoyvíkshagi 3,5 mill.
2. Gerð av forprojekti
   Gera forprojekt til myndugleikaviðgerð
3. Borgarakunning
   Hava kunningarfund fyri borgarunum í Hoyvík
4. Myndugleikagóðkenning, friðingarnevndir, Føroya Stift
   Náttúru- og yvirfriðingarnevndarloyvi og loyvi frá Føroya Stift, kunngerð um kirkjugarðar.
5. Projektering/útbjóðingartilfar og útbjóðing
   At bjóða út til tvey projekterandi feløg at projektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða út og hava lisitatión
6. Tíðarætlan
   Tíðarætlan keyp av lendi medio 2015, loyvir ultimo 2015, projektering og útbjóðing medio 2016 arbeiði kann byrja aftaná summarfrítíðina 2016.

Peningur er tøkur á karminum 6575 fyri 2014, men onki er játtað, til víðari arbeiði við málinum. Eingin fíggjarkarmur er avsettur á íløgum 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka støðu til, um verkætlanin skal setast í verk eftir leistinum sum skotin er upp, og um neyðugur fíggjarkarmur skal játtast til verkætlanina komandi ár, fyri 2016.

Verður avgjørt at arbeiða víðari við málinum, skal málið til teknisku nevnd til viðgerðar og fíggjarnevndina til samtyktar at leggja fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Útsett til komandi fund, tá tað verður lýst og framlagt í sambandi við staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Tekniska nevnd 04. mars 2015**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um kirkjugarðin í Hoyvík, sí hjálagda skjal. Fyrsta byggistig fevnir um gerð av lendi til 320 gravir, at skipa atkomuveg og parkeringspláss til 72 bilar, at byggja lítið arbeiðshús til amboð og uppihald. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu nýggi kirkjugarðurin ynskist skipaður. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð, og til løgdeildina at fyriskipa og fremja keyp av lendi frá Búnaðarstovuni. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, at bjóða projekteringina út, og at beina málið til løgdeildina at keypa lendi.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 02. december 2015: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.**

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
**Kirkjugarðurin í Hoyvík hevur verið úti í kapping, har tvær ráðgevarafyritøkur vórðu bidnar um at koma við einum skipanaruppskotið til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík, umframt tilboði upp á ráðgevarakostnað fyri 1. byggistig. Skipanaruppskotið varð vektað við 25% og ráðgevarakostnaðurin varð vektaður við 75%.**

**Fríggjadagin 26. februar 2016 komu undirhondsboðini frá tveimum ráðgevarafyritøkum inn.**

**Kostnaðarstøðið fyri ráðgevingina av 1. byggistigi var høgt og var eisini stórur munur millum tey tvey tilboðini, sum vórðu latin inn. Harumframt vóru kostnaðarmetingarnar fyri bygging av byggistigunum eisini høgar, og sostatt metti dómsnevndin, mannað av umsitingini, at vegna høga kostnaðarstøði, er ikki ynski at taka av nøkrum av tilboðunum, men heldur lata Býarskipan arbeiða víðari við verkætlanini, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samsýna bjóðarunum kr. 25.000 í part fyri luttøkuna, og at býarskipan arbeiðir víðari, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Býráðsfundur 17. mars 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeitt verður við skipan av kirkjugarðinum. Býararkitekturin kemur at greiða frá tilgongdini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til Kirkjugarðin í Hoyvík, sí viðheftu skjøl (14/00772-38, 1,2,3,4)

Í fyrsta byggistigi er pláss fyri umleið 380 gravum. Afturat tí er pláss fyri barnagravum, urnugravum og felagsøki við plássi til starvsfólk. 1. stig fevnir eisini um arbeiðsveg frá Klingruni inn á arbeiðsøkið, umframt útgrevstur til parkeringspláss. Umsitingin metir, at atkomuvegur og parkeringspláss eiga at vera ein sjálvstøðug teknisk verkætlan.

Skotið verður upp í fyrsta lagi at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð. Í útbjóðingini verða hesi arbeiði gjørd:

*Flytan og niðurtøka av verandi stiki/hegni*
*Arbeiðsvegur inn á kirkjugarðsøkið frá Klingruni*
*Avgrevstur og burturbeining av tilfari av 1. byggistigi*
*Avvatning*
*Møgulig spreinging*

Tá øll neyðug loyvi frá myndugleikum, keyp av lendi og broyting av byggisamtykt er fingin til vega, verður útbjóðingartilfarið sent út til 2 arbeiðstakarar. Arbeiðstakararnir, ið eftir ætlan sleppa at bjóða, vera:
P/F Hansen & Jakobsen
Sp/f Hellisdal
Byrjað verður eftir ætlan 1. juni, og hetta arbeiðið er mett at taka 5 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð eftir omanfyri standandi lýsing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti.**

Løgdeildin hevur kannað møguleikarnar fyri at keypa lendið frá Búnaðarstovuni.

Festarin er hoyrdur og eru allir formalitetir í samband við avlýsing av tinglýstum, leigusáttmála og deklaratión á ognini eisini avgreiddir.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina fyribils tilsøgn, keypsprísur 2.311.500,00

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at keypa lendið fyri 2,4 mill. kr. sum verður fíggjað av íløgukarminum 2016 á 6575 kirkjugarðar.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13104<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

# 145/16 Søla vinnustykki undir Kongavarða - partur av matr. nr. 255a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 178/15 | 15/01815-7 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 145/16 | 15/01815-7 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 186/16 | 15/01815-7 |

## **Málslýsing**:

Vinnugrundstykkið undir Kongavarða, umleið 5.500 $m^2$ av matr nr. 255a, hevur verið lýst til sølu í bløðunum og á heimasíðuni hjá kommununi, og inn komu tvey boð.

- P/f Sms hevur boðið 2.750.000 kr. svarandi til 500 kr/$m^2$
- P/F Poul Hansen boðið 3.500.000 kr. svarandi til 636 kr/$m^2$

Sp/f Ráð hevur virðismett part av stykkinum ið var lýst til sølu. Talan var um 4.386 $m^2$, í mun til uml. 5.500 $m^2$ ið var lýst til sølu. Metta virði er 1.400 kr/$m^2$ umframt 1,35 mió. kr. fyri planering. Tilsamans 7.490.400 kr., svarandi til 1.708 kr/$m^2$.

## **Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at fíggjarnevndin tekur støðu til innkomin tilboð.

Tilfar kemur til fundin.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka upp samráðingar við tilboðsgevaran, ið hevði hægsta boð, um freistir og leist fyri bygging á ognini.

**Ískoyti**

Samráðingar hava verið við keyparan og fyribils skeyti er góðkent av keyparanum. Í skeytinum er m.a. áseting um byggifreist.

**Tilmæli**

Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at selja P/F Poul Hansen vinnustykkið fyri 3.500.000 kr., við teim treytum, ið eru ásettar í fyribilsskeytinum, viðlagt

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 146/16 Keyp av lendi. Atkoma til útstykking Oman Gil. Partur av Klingruni.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2016 | 53/16 | 16/00706-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 65/16 | 16/00706-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 165/16 | 16/00706-3 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 146/16 | 16/00706-3 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur umbiðið matrikulering av útstykkingini Oman Gil.

Matrikulstovan vísir á, at kommunan ikki eigur undirlendið undir vegnum (Klingran), sum liggur á ogn hjá Jarðarráðnum.

Neyðugt er at keypa undirlendið undir vegnum, sum tryggjar atkomuna frá rundkoyringini og til útstykkingina Oman Gil.

Talan er um umleið 12.100 m$^2$, sí kortskjal 16/00706 – 1.

Málið hevur skund, tí útstykkingin Oman Gil er um at verða liðug, og er neyðugt at grundstykkini verða matrikuleraði, áðrenn endaligu søluskeytini verða skrivaði.

Um keypsmálið viðvíkjandi undirlendinum dregur út, og Matrikulstovan ikki fær avgreitt matrikuleringina av útstykkingini, er ætlanin at senda umbøn til Jarðarráðið um at fáa tinglýstan atkomurætt til útstykkingina.

Talan verður um at senda umbønirnar til Jarðarráðið síðuleypandi, so báðir møguleikar eru opnir, fyri at fáa matrikulmálið avgreitt skjótast gjørligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at umrøða keypsmálið í byggi- og býarskipanarnevndini, og verður málið síðani fyrilagt fíggjarnevndini at taka støðu til keyp av undirlendinum undir vegnum Klingran, soleiðis at atkoman til útstykkingina Oman Gil verður tryggjað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2016:** Málið umrøtt og beint í fíggjarnevndina.

**Ískoyti 16.02.2016.**
Mettur keypsprísur fyri lendið, íroknað sakarkostnað- og matrikulútreiðslur v.m. er 1,2 mill. kr.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Málið umrøtt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13106 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og fíggja keyp av lendi v.m. av L64004 Útstykkingin Millum Gilja og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

## 147/16 Útstykking á Hamrabø matr. nr. 91a, Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2015 | 133/15 | 15/00969-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 149/15 | 15/00969-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 134/15 | 15/00969-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.08.2015 | 153/15 | 15/00969-1 |
| 5 Kollafjarðarnevndin | 19.10.2015 | 9/15 | 15/00969-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 193/15 | 15/00969-1 |
| 7 Kollafjarðarnevndin | 23.11.2015 | 16/15 | 15/00969-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 248/15 | 15/00969-1 |
| 9 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 184/15 | 15/00969-1 |
| 10 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 221/15 | 15/00969-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 02.03.2016 | 32/16 | 15/00969-1 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 67/16 | 15/00969-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 132/16 | 15/00969-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.05.2016 | 134/16 | 15/00969-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 19.05.2016 | 188/16 | 15/00969-1 |
| 16 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 147/16 | 15/00969-1 |

### Málslýsing:
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri ognina matr.nr. 91a, Hamrabøur í Kollafirði. Eftir uppskotinum er pláss til umleið 21 grundstykkir millum 510 og 600 $m^2$ til sethús plus 2 grundstykkir fram við á Homrum. Grundstykkini hava tvørfall uppá millum 6 og 8 metur. Útstykkingin hevur umleið 330 m av vegi, 16 eyka p-pláss og gøtusamband til á Homrum. Vegurin er 8 m breiður, harav 1 m gongubreyt á hvørjari síða.

Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting (sí skjal 1).

Skjal nr. 1. Kostnaðarmeting.
Skjal nr. 2. Støðumynd.
Skjal nr. 3. Skurðir
Skjal nr. 4 Longdarskurður

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við uppskotinum, at kunna teknisku nevnd um ætlanina og at útvega fígging til gerð av projektuppskoti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at útvega fígging til projektuppskot.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 100.000 av konto 6175, keyp og søla, til projekstuppskot.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur bjóðað gerð av dispositionsuppskoti út millum 5 ráðgevarafyritøkur. Lisitation varð hildin 15. juli 2015. 2 boð komu inn.

| | |
|---|---|
| HMP | 69.000 kr. u.MVG |
| RAM consult | 88.700 kr. u.MVG |

HMP hevði soleiðis lægsta boð og hevur 13.08.2015 latið inn dispisitionuppskot. Uppskotið hevur verið til ummælis í umsitingini og smávegis rættingar eru gjørdar.

HMP hevur latið inn kostnaðarmeting. Sambært kostnaðarmetingini verður kostnaðurin, av byggibúningar arbeiðinum fyri 23 grundstykkir á miðalvídd uppá 550 $m^2$, mettur at verða 4.561 mió.u.MVG. Roknað er við eini byggitíð uppá 8 mánaðar.

Samlaði fíggjartørvurin íroknað prosjektering, eftirlit, ókent og MVG,verður sostatt kr. 6,89 mio. v.MVG, svarandi til ein $m^2$ prís uppá 542 kr/$m^2$ v.MVG og ein prís fyri eitt 500 $m^2$ grundstykki uppá 270.788 kr. v.MVG. Hesin kostnaðurin er tó treytað av at:

1. TK eigir fríøkini.
2. Útreiðslur til ráðgevara verður minkað niður í 7% av anlegsútreiðslunum.
3. Avgrevstur verður lagdur í Kollafirði í staðin fyri í Villingadali.
4. Burturbeining av fjósi verður tikið úr prosjektinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna omanfyri nevndu treytir fyri at minka um kostnaðin av grundstykkjunum og at umsitingin arbeiðir víðari við gerð av høvudsprojekti.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. august 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin metir, at kostnaðurin í sambandi við projektering og útbjóðing verður 190.000 kr. v.MVG.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 190.000 kr. til projektering og útbjóðing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 19. oktober 2015:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at játta kr. 190.000 til projektering og útbjóðing av konto 6475 og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Einmælt samtykt.
**Ískoyti**:
Víst verður til samtyktirnar í býráðnum 22. juni 2015 og 29. oktober 2015, sum skulu staðfestast við aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt.

**Kollafjarðarnevndin 23. november 2015:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið ráðgevan HMP-Consult gjørt høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar av verkætlanini.
Fyri at fáa eitt so álítandi útbjóðingartilfar sum møguligt, hevur byggiharrin latið gjørt jørðbotnskanningar av lendinum. Tað er ráðgevin Munin, sum hevur gjørt sokallaðar Georadarakanningar av grevstrarøkinum. Eisini eru gjørdar grevstrarroyndir fyri at staðfesta, um hesar kanningar svara til hvørja aðra.

**Umhvørvisárin**
Umsitingin er í gongd við at senda eina umsókn til Yvirfriðingarnevndina fyri Streymoyar Sýtslu um loyvi til at fara í gongd við verkætlanina.

**Tekningar**
TK j. nr. 15/04774-1

**Gransking**
Umsitingin hevur granskað heildarverkætlanina.

Tekniska nevnd tekur støðu til tekniska prosjektið so sum vegaprofil, skráningar, parkeringsøkir og tekniskar leiðingar.

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um øll verkætlanin skal bjóðast út, ella bert ein partur av henni, har atlit verða tikin til eftirspurningin eftir grundøkjum í Kollafirði. Eisini skal nevndin taka støðu til, hvør útbjóðingarhátturin skal verða.

**Tilmæli til teknisku nevnd:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðtaka tekniska prosjektið.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða alt arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar og at leggja málið aftur fyri byggi- og býarskipanarnevndina fyri at taka støðu til innkomnu tilboðini.

**Tekniska nevnd 02. mars 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og vísir á, at treytir skulu setast grundstykkjaeigarunum um grevstur uppat kommunalum vegi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur heitt á HMP-Consult um at bjóða arbeiðið út til fimm arbeiðstakarar sum innbodna lisitatión.
Lisitatiónin verður hildin 26. apríl, kl. 15.00 á teknisku deild hjá Tórshavnar kommunu.

**Viðkomandi skjøl**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 15/04774-3 | Tekningar stemplaðar góðkendar av býarverkfrøðinginum |
| TK j. nr. 15/04689-1-5 | Innkomin tilboð |
| TK j. rn. 15/04689-6 | Lisitatiónsprotokoll |
| TK j. nr. 15/04713-3 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli kemur til fundin.**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Lisitatión hevur verið, og innkomnu tilboðini vóru hesi.

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Tórhallur Hansen Sp/f | kr. 7.713.712,- |
| 2. | IR Lastbilar áljóðandi Sp/f | kr. 6.888.882,- |
| 3. | J&K Petersen P/f | kr. 9.743.618,- |
| 4. | Við Sjógv Sp/f | kr. 6.457.158,- |
| 5. | Við Sjógv Sp/f – Alternativt boð | kr. 6.141.908,- |

**Kostnaðarmetingar**
Ráðgevin, HMP-Consult, hevur gjørt eina kostnaðarmeting fyri anlegdsarbeiðið á kr. 6.200.000,-, sí j.nr. 16/04713-1.

Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting við støði í alternativa tilboðnum frá Sp/f við Sjógv. Kostnaðarmetingin er íalt áljóðandi kr. 7.450.000. Hetta er tó treytað av at loysn kann finnast uppá at sleppa av við avgrevsturin í nærumhvørvinum. Um ikki, er kostnaðurin uml. kr. 300.000,- hægri. Hjálagt er kostnaðarmeting.
Arbeiðið er mett at taka 15 mánaðir og verður væntandi liðugt í oktober 2017.
Áður eru játtaðar kr. 290.000,-. Fíggjartørvurin er sostatt kr. 7.160.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá Sp/f við Sjógv og heimila umsitingini at gera sáttmála um arbeiðið og bjóða fakeftirlitið út.
Mælt verður til, at verkætlanin verður fíggjað við at flyta kr. 3.312.000,- frá játtanini til útstykking á Lygnesi, og restin, kr. 3.848.000,-, verður fíggjað við sølu av grundøkjum í 2017.
Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at taka upp samráðingar við arbeiðstakaran Sp/f við Sjógv, gera sáttmála og bjóða fakeftirlitið út í innbodnari lisitatión millum 5 ráðgevar.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. maj 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 148/16 Keyp av lendi. Atkomuvegur til Kirkjugarðin í Hoyvík v.m.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 174/16 | 16/01832-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 148/16 | 16/01832-1 |

**Málslýsing:**

Kommunan keypir lendið til Kirkjugarðin í Hoyvík. Matrikulstovan vísir á at tilber ikki at frámatrikulera lendið til sjálvan kirkjugarðin, fyrr enn atkomuviðurskiftini eru avgreidd, og mælir Matrikulstovan til at kommunan keypir lendið til vegin, soleiðis at bæði frábýtismálini kunnu avgreiðast um somu leið.

Málið um staðseting av vegnum hevur ikki verið viðgjørt í byggi og býarskipanarnevndini, men hevur starvsfólk í byggi og býarskipanardeildini gjørt eitt leysligt uppskot um hvussu økið kundi verið skipað.

Í nevnda uppskotið framgongur at lendið til sjálvan vegin verður uml. 4.100m2.

Ein mettur keypsprísur til lendið verður á leið 400.000 kr. íroknað sakargjald og tinglýsing.

Avbjóðingin er at kommunan ikki fær frámatrikulerað lendið til sjálvan kirkjugarðin uttan so at atkoman til kirkjugarðin er tryggjað, og metir matrikulstovan, at kommunan eigur at ogna sær lendið til vegin soleiðis, at frámatrikuleringin av lendinum til kirkjugarð og frámatrikulering av lendi til vegin kunna avgreiðast undir einum.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at kommunan fær heimild til at keypa lendið til atkomuvegin, mettur keypsprísur í alt íroknað frábýtis útreiðslur og tinglýsing v.m. eru 400.000,00 kr.

Keypið verður fíggjað av íløgukarminum 2016 á 6575 kirkjugarðar.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 149/16 Umsókn um at rætta upp á matriklarnar litra og matr. 683i Stoffalág 33 Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 91/16 | 14/00323-8 |
| 2 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 48/16 | 14/00323-8 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 161/16 | 14/00323-8 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 149/16 | 14/00323-8 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Marjun og Jørleif Joensen Stoffalág 33 matr. 683i, søkja kommununa um at rætta upp á matriklarnar soleiðis, at gongubreytin verður matrikulerað til vegin Stoffalág, søkt verður eisini um at gongubreytin verður asfalterað.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Viðmerking frá teknisku deild er, at tað ikki skal tvinnast saman matrikuleringin og asfalteringin.

Tað er so nógvar aðra staðni at ynski er um asfaltering, so tað má koma í eini raðfesting.

Tað verður viðmælt, at man ruddar upp í matriklinum hjá Tórshavnar kommunu, snøklar sum ikki eru ummatrikuleraðir, tá ið man hevur gjørt nýggjar vegir frá gamlari tíð.
Sambært hjálagda matrikulkorti skal kommunan lata meira enn hon fær av øki til at leggja til vegin, umframt at gjalda fyri matrikuleringina umleið 4.000 kr. til Umhvørvisstovuna.

Marknaumskipanin verður soleiðis:
Matr. 683i letur umleið 39 fermetrar til litra og litra letur umleið 50 fermetrar til matr. 683i.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Tórshavnar kommuna skal gjalda umleið 4.000 kr. til Umhvørvisstovuna fyri marknaumskipanina.

**Skjøl**
Umsókn frá Marjun og Jørleif Joensen
Kort úr Bentley

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla nevndini til at viðmæla marknaumskipanina millum matr. 683i og litra, fyri at rætta upp á matriklarnar og beina málið í teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 150/16 SEV: Umsókn um lendi og broyting av byggisamtykt til víðkan av Sundsverkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 125/16 | 16/01392-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 129/16 | 16/01392-2 |
| 3 Vinnunevndin | | | 16/01392-2 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 150/16 | 16/01392-2 |

**Málslýsing:**
SEV hevur í hyggju at sleppa ætlanini um at víðka Sundsverkið eystureftir men ætlar í staðin at víðka verki vestureftir, um ræði fæst á neyðuga lendinum har og um neyðug loyvi fáast til útbyggingina á hesum stað.

Í hesum sambandi søkir SEV um at keypa umleið 8-10.000 m$^2$ av matr. nr. 4c, eystanfyri verandi verk, fyri at kunna fremja ætlaðu útbyggingina. Øki er merkt “A” á kortinum frá SEV.

Harumframt søkir SEV um at fáa optión uppá at keypa restina av matr. nr. 4c, umleið 22.000 m$^2$, til komandi orkuendamál. Økið er merkt “B” á kortinum frá SEV.

Í sambandi við ætlanina má byggisamtyktin fyri økini A og B broytast.

Sp/f Sundsneystini og Tórshavnar kommuna gjørdu í september 2008 leigusáttmála um sama øki, matr. 4c, (j. nr. 14/02723). Ætlanin er at byggja umleið 100 neyst við tilhoyrandi útgerð og havnaviðurskiftum.

Ísv. mál um útbygging og dagføring av Sundsverkinum, j. nr. 2012-0377, var ætlanin, at makaskifti við gamla el-verki í Gundadali skuldi vera ein partur av málinum. Av tí hetta ikki lat seg gera tá varð samtykt, at í einari søluavtalu við Sev at gera avtalu um at venda aftur til upprunaligu ætlanina um makaskifti fyri restina av lendinum við gamla el-verkið í Gundadali, tá SEV hevur funnið onnur hóskandi hølir at flyta virksemið í Gundadali í.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanar-nevndina og vinnunevndina.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at bíða við støðutakan til umsóknina frá SEV, til viðurskiftini við Sundsneystini eru avgreidd.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtykt hjá Fíggjarnevndini 13. apríl 2016 um broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki inni á øki eystan fyri Sundsverkið frá E-øki til B9 øki, hevur býarskipanardeildin gjørt uppskot til broyting av byggisamtyktini.

Í sambandi við ætlanirnar at byggja neyst á matr. nr. 4c á Sundi, var serstøk byggisamtykt gjørd fyri skipan av økinum til byggjan av neystum og bátadrátti. Serstaka byggisamtyktin var góðkend av Innlendismálaráðnum tann 15. juli 2011. Við nýggju ætlanunum við økinum má serstaka byggisamtyktin avlýsast.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt sambært hjáløgdu kortum, dagf. 19.04.2016, og avlýsa serstøku byggisamtyktina fyri matr. nr. 4c á Sundi og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 151/16 Graslíki á komandi fótbóltsvøll í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.04.2016 | 114/16 | 16/00407-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 163/16 | 16/00407-3 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 131/16 | 16/00407-3 |
| 4 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 151/16 | 16/00407-3 |
| 5 Býráðsfundur | | | 16/00407-3 |

**Málslýsing:**
Talan er um framhald av máli nr. 14/03366 – Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík – oman gil, ið aftur er framhald av málunum nr. 14/000714 – Staðseting av fótbóltsvølli í Hoyvík – Dalurin langi bóltvøllur (2010-0498) og máli nr. 14/01462 - Nýggjur fótbóltsvøllur í Hoyvík.

Arbeiðið við at gera fótbóltsvøllin verður ætlandi liðugt innan 2 mánaðir. Í verandi verkætlan er ikki íroknað graslíki, umframt undirlag (t.e. skerv, asfalt, sand, innfill, stoytdoyvingarlag), ið er neyðugt fyri at fáa ein vøll eftir nútíðans krøvum.

Í verandi verkætlan er ymiskt, ið ikki er íroknað verkætlanina, umframt graslíkisvøllin, eitt nú kloakkleiðingar við tilhoyrandi brunnum, el-arbeiðið, gittarmastur til vallarljós, áskoðarapláss, lendisjavning, betongtrappa, gøta og hegn, innkoyring og parkering frá Karlamagnusarbreyt, útskriftingarbenkur o.a. Tá verkætlanin er liðug verður nærri greitt hvat er eydnast at fáa við av hesum innanfyri verandi fíggjarkarm.

Tíðarætlan
Uttandura vallir og umsitingin hava saman við LBF P/F hava mett um tíðarætlan fyri at fáa lagt graslíki á í summar. Frá tí at samtykt fyriliggur vil samlaða tilgongd frá útboð til lisitatión verða umleið 4 vikur og síðani nevndarviðgerð og í býráðið umleið 3-4 vikur. Um málið verður samtykt í apríl kann vøllurin verða liðugur at taka í brúk í heyst. Sí hjálagt útbjóðingartilfar.

Mett verður at kostnaðurin fyri arbeiðið er umleið 3,6 mio.kr. alt eftir marknaðarstøðuni og kapping innan graslíkisveiting og innan tilfar og gerð av arbeiðinum. Hartil er sannlíkt at onnur liðugtger av økinum kring vøllin kann koma at kosta 2-3 mio.kr (við fyrivarni fyri nærri metingum tá verandi verkætlan er liðug í næstum – nýtt tilmæli kemur um tað tá).

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin av stjórnarskrivstovuni mæla nevndini til at samtykkja at heimilað umsitingini at fara undir útbjóðing av arbeiðinum við at leggja á graslíki vm. á Hoyvíksvøll og venda aftur til nevndina við einum úrsliti til støðutakan. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. april 2016:** Ein meiriluti Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr tekur undir við tilmælinum.

Minnilutin Jógvan Arge tekur støðu, tá greitt yvirlit er útvegað yvir kostnaðin av tí, sum higartil er gjørt við vøllin, og yvir mettan kostnað at gera vøllin lidnan.

Helena Dam á Neystabø var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**
Samlaði fíggjarkarmurin, ið játtaður er til arbeiðið at gera fótbóltsvøllin, er kr. 17,625 mió. Disponeraðar kostnaðarupphæddir eru kr. 17,227 mió. Avlopið er kr. 397.534.

Írestandi løgukarmurin til vøllin í Hoyvík fyri 2016 er kr. 2.000.000. Harumframt er samtykt við 1. viðgerð í býráðnum kr. 1.000.000 aftrat. Verður hetta samtykt við 2. viðgerð, er tøka játtanin sostatt kr. 3.397.534.

Kostnaðarmeting fyri verkætlanina við at leggja graslíkið er kr. 4.070.820 v/mvg.
Fíggjartørvur er sostatt kr. 673.286.

Tað eru eisini onnur arbeiði kring vøllin, sum ikki eru tikin við omanfyri – talan er um el-arbeiði, trappur, innkoyring og áskoðaraskýli, samlað kostnaðarmeting fyri hesi arbeiði er kr. 2.359.539 v/mvg.

Mett verður, at konta 5710 uttandura vallir kann fíggja írestandi partin til graslíkið og til okkurt av mest neyðugu arbeiðunum, sum eftir eru at gera kring vøllin, í alt kr.1.600.000, ið verður at játta til løgukontuna 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 3.000.000 av íløgukarminum 5775 ítróttaranlegg og kr. 1.600.000 av kontu 5710 uttandura vallir til løgukontu L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og heita á umsitingina um at leggja við eina greiða uppseting av kostnaðinum av vøllinum í Hoyvík til viðgerðina í fíggjarnevndini og býráðnum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at kr. 2.000.000,00 verða játtaðar av íløgukarminum 5775 Ítróttaranlegg og kr. 1.600.000,00 av konto 5710 uttandura vallir til løgukonto L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið krevst tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

# 152/16 Planlegging í 2013 av at savna kloakkir út á sjógv á Argjum - Argir Bakkagøta og Argjaboða, smb. spillivatnsætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.01.2015 | 3/15 | 14/01987-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2015 | 2/15 | 14/01987-3 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2015 | 10/15 | 14/01987-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 1/16 | 14/01987-3 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 57/16 | 14/01987-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 172/16 | 14/01987-3 |
| 7 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 152/16 | 14/01987-3 |

## Málslýsing:

Lýsing av málinum – samandráttur:
Sambært góðkendari spillivatnsætlan hjá TK, er ætlanin at fara undir arbeiðið at samla kloakkirnar á Argjum. Talan er um at skipa kloakkleiðing frá Kráargøtu og Bakkagøtu og leiða tær út á streymasjógv. Í løtuni verður stórur partur av spillivatni leitt út í Rossá, sum munnar út í fjøruna (víst verður til frágreiðing j.nr. 14/01987-4 og tekning j.nr. 14/01987-6).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið er mett at kosta kr. 2,8 mio. og er ynski um at fáa heimild at fáa PB Consult at gera útbjóðingartilfar klárt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

Samlaða upphæddin fyri markaðum íløgum fyri kloakkir í 2015 er 3 mió. kr. og er ætlanin at nýta 0,25 mió. kr. til prosjektering fyri dagføring av útleiðingunum.

Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 14/01987-5 verður samlaði fíggjartørvurin fyri at gera útbjóðingartilfar kr. 0,25 mió. (við 6,25% MVG).

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 0,25 mió. av markaðum íløgum fyri kloakkir fyri 2015, konto 6875 (Kloakkir) L68019 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 07. januar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 29. januar 2015: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera prosjekt og útbjóðingartilfar er liðugt og er ynskið at bjóða prosjektið út í innbodnari lisitatión.

## Tilmæli:

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at prosjektið verður boðið út, lisitatiónsprotokoll verður gjørd og málið verður lagt fyri nevnd aftur at taka støðu til. Prosjektið skal fíggjast av íløgum fyri kloakkir konto 6875.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti:**
Arbeiðið at savna kloakkirnar fram við Rossá og Bakkagøtu var boðið út í innbodnari lisitatión j.nr. 14/0197-14. Lisitatiónin varð hildin á skrivstovuni hjá PB Konsult 7. apríl 2016, kl. 14.
Inn komu 4 boð, av teimum hevði sp/f Plan læsta boð. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokoll og innstilling saman við ráðgeva j.nr. 14/01987-25.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð j. nr. 14/01987-26 verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektið kr. 3,4 mió. (við 6,25% mvg)

Samlaða upphædd fyri markaðum íløgum 2016 er kr. 5,8 mió. Á konto 6875 .

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 3,4 mió. Av íløgum fyri kloakkir 2016, konto 6875, og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016: Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

# 153/16 Regnvatnsleiðing úr Marknagili - projekt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 29.04.2015 | 59/15 | 15/01396-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 123/15 | 15/01396-2 |
| 3 Býráðsfundur | 21.05.2015 | 95/15 | 15/01396-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.01.2016 | 3/16 | 15/01396-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.01.2016 | 18/16 | 15/01396-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 25/16 | 15/01396-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 58/16 | 15/01396-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 171/16 | 15/01396-2 |
| 9 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 153/16 | 15/01396-2 |

**Málslýsing**:

Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

Í sambandi við arbeiðið at byggja skúladepilin í Marknagili, hevur Landsverk gjørt avtalu við kommununa, j. nr. 14/00941/188, um at leggja pening út til fíggingina av arbeiðinum til regnvatnsleiðing v.m.

Útbjóðingartilfarið til 1. byggistig til regnvatnsleiðing úr Marknagili oman í Sandá fór út 20. mars 2015. Avgjørt var at bjóða arbeiðið út í 2 byggistigum.

- Byggistig 1 er frá Landavegnum oman í Sandá
- Byggistig 2 er frá Marknagili til Landaveg.

Grundin til at avgjørt var at bjóða arbeiðið út í tveimum arbeiðstøkum er, at tað er ikki endaliga staðfest, hvussu vegurin verður gjørdur í sambandi við nýggja Vesturskúlan og best hevði verið um regnvatnsleiðingin verður løgd samstundis sum vegurin verður gjørdur.

Teir bjóðandi vóru:

- Articon
- J&K Contractors
- Plan v/Johannes Hellisdal
- Maskinkoyring
- P/F Tórhallur Hansen
- Andrias Berg

Lisitatión varð hildin 13.04.2015. Víst verður til lisitatiónsprotokoll j. nr. 15/01396-3. Av innkomnu tilboðunum var lægsta boðið frá p/f Tórhallur Hansen áljóðandi uml. 6,1 mió. kr.

Umsitingin kunnar um lisitatiónsúrslitið og tilmæli frá rágeva j.nr. 15/01396-4 og um hvussu farið verður undir arbeiðið.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2015:** Kunnað varð um málið. Nevndin samtykti at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samtykt at taka av lægsta tilboðnum frá P/F Tórhalli Hansen áljóðandi kr. 6.163.000,- og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 21. mai 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í Íløguætlanini fyri 2016 eru avsettar kr. 10,8 mió. til kloakk í Marknagili.
Víst verður til mál nr. 14/04040, har býráðið 18. september 2014 samtykti at játta kr. 10,8 mió. til arbeiðið at leggja regnvatnsleiðing frá skúladeplunum oman til Sandá fíggjað av langtíðar íløgum fyri kloakkir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 10,8 mió. av íløgukarmi fyri kloakkir 6875 - Kloakk í Marknagili - fyri fíggjarárið 2016 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. januar 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Íbúgvar í grannalagnum í Lìtlagerði hava gjørt vart við at gongubreytirnar í økinum treingja til ábøtur. Arbeiðstakarin hevur givið umsitingini tilboð upp á gerð av gongubreytum og kemur hetta at kosta uml. 0,6 mió. kr.

Eftir sum peningur ikki er tøkur innan játtanina fyri regnvatnsarbeiðið, kann fígging útvegast frá markaðum íløgum til vegir, kto. 8175, fyri fíggjarárið 2016. Tøkar eru kr. 2,3 mió. til ymsar vegaætlanir fyri 2016.

**Tilmæli:**
Vísandi til at stórur tørvur er at fáa dagført gongubreytirnar í Lítlagerði mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at játta kr. 0,6 mió. av íløgum fyri vegir 8175 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13122<br><br>Formansins merki: |

# 154/16 Framflytingar roknskaparárið 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 148/16 | 16/01591-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 122/16 | 16/01591-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 154/16 | 16/01591-1 |

**Málslýsing:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. T.v.s. við tveimum viðgerðum.

Í sambandi við at roknskapurin fyri 2015 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2016. Samlaða framflytingin fyri rakstur er eitt netto undirskot á 4,7 mió. kr. Ikki nýttar íløgujáttanir at flyta fram eru 154,8 mió. kr. Bókaðar skattainntøkur og aðrar inntøkur í 2015 vóru 72,8 mió. kr. hægri enn mett í fíggjarætlanini.
Yvirlitið saman við ynsktum broytingum verður lagt fram saman við roknskapinum fyri 2015.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting á t.kr. -4,7 mió. kr. netto, til rakstur og 154,8 mió.kr. til íløgur. Eisini verður mælt til, at taka undir við niðanfyristandandi broytingum:

Framflyting
Uppskot til broyting

| Flytast av: | | | Flytast á: | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Navn | upphæd | Deild | Navn | upphædd |
| 2612 | Barnavernd | 350.000 | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 350.000 |
| 2617 | Brúkaragjald, serstovnar | 600.000 | 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 600.000 |
| | | | | | |
| 3110 | Reiðrið | 1.081.000 | 3199 | Regulering barnatal | 1.081.000 |
| 3213 | Systkinaavsláttur | 2.000.000 | 3199 | Regulering barnatal | 2.000.000 |
| | | | | | |
| 4124 | Frískúlin í Havn | 70.000 | 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 70.000 |
| 4142 | Aðrar útreiðslur skúlar | 40.000 | 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 40.000 |
| 4144 | Skúlabarnaflutningur | 90.000 | 4140 | Ætlanir á skúlaøkinum | 90.000 |

| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13123<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

Mælt verður til at hægri skattainntøkurnar verða brúktar til fígging sambært niðanfyristandandi talvu:

| | | |
|---|---|---|
| **Meirinntøkur 2015** | | **72.767** |
| t.kr. 1000 | | |
| 1110 | Býráðið | -113 |
| 1210 | Val og valnevndir | -322 |
| 1460 | Kommunufeløg | -281 |
| 2720 | Heilsuhúsið | -1.180 |
| 2721 | Røktartænastur | -7.898 |
| 2722 | Tilboð | -2.492 |
| 5510 | Tórshavnar Býarsavn | -633 |
| 7210 | Brandstøðin | -1.522 |
| **Meirnýtsla á ymiskum rakstrarstøðum** | | **-14.441** |
| Samtykt | Ymiskt asfalt arbeiði | -2.000 |
| Samtykt Heilsuhúsið | Húsaumsitingin | -1.200 |
| **Samtykt meirinntøkur** | | **-3.200** |
| **Avdráttir 2015** | **Afturgjald av skuld** | **-16.671** |
| **Annað** | | **38.455** |

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Ein samd nevnd tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, mælir harumframt býráðnum til at taka undir við niðanfyristandandi jattan, sum ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu til á einum seinni fundi:

| | | |
|---|---|---|
| 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | - 7.000 |
| | Eldrarøkt | - 8.000 |
| **Rakstur** | | **- 15.000** |
| | | |
| 5375 | Mullers Pakkhús | - 2.000 |
| 5775 | Ítróttaranlegg - Tórsvøllur | - 5.000 |
| 5775 | Ítróttaranlegg - Svimjihøllin | - 1.500 |
| 5775 | Ítróttaranlegg -Fótbóltsvøllur í Hoyvík | - 1.000 |
| | Kommunuskúlin | - 12.155 |
| | Bankabygningur Niels Finsensgøta | - 1.800 |
| **Løgur** | | **- 23.455** |
| | | |
| **Tilsamans** | | **- 38.455** |

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrina Frýdal, ið tekur undir við tilmælinum og mælir til, at fluttar verða av koto 5775 Ítróttaranlegg Tórsvøllur 5 mió. og Fótbóltsvøllur í Hoyvík 1. mió, tils. 6 mió. kr., ið verða fluttar til eldraøki, ið fall við 2 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreassen og Sjúrður Olsen ið taka undir við framflytingunum við tí viðmerking, at greitt ábyrgdarbýti er millum FSF og Tórshavnar kommunu og hvør partur kommununar verður í verkætlanini skal vera greitt ásett, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge hevur ta viðmerking, at hann tekur undir við tilmælinum frá kommunustjóranum, fyrisitingarstjóranum og fíggjarleiðaranum men hann tekur ikki undir við at játtað verður til Tórsvøll áðrenn ábyrgdarbýtið millum FSF og Tórshavnar kommunu er ásett.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá borgarstjóranum, um at flyta 1.050 tkr. av rakstrarkonto 5210 til løgukonto 5275 (L52001), ið varð einmælt samtykt.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá kommunustjóranum, ið var samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atÍmóti atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

## 155/16 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 115/16 | 16/00040-1 |
| 2 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 70/16 | 16/00040-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2016 | 151/16 | 16/00040-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.04.2016 | 119/16 | 16/00040-1 |
| 5 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 155/16 | 16/00040-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 167/16 | 16/00040-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | | | 16/00040-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | | | 16/00040-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Framlagt og góðkent.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. apríl 2016:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 19. mai 2016:** Framlagt og góðkent.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>19. mai 2016 | Blað nr.: 13128<br><br>Formansins merki: |

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 21:45</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Rúni Djurhuus | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrun Amalia Mohr | |